# Integrasjónsálit

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Innihald


| | | |
|---|---|---|
| 1. | Formæli | 4 |
| 2. | Um integrasjónsálitið | 5 |
| 3. | Samandráttur | 7 |
| 4. | Integrasjónsavbjóðingin í dag | 9 |
| 5. | Integrasjónspolitikkur | 11 |
| 6. | Royndirnar aðrastaðni við integrasjón | 12 |
| 7. | Lýsing av útlendingaøkinum í Føroyum | 13 |
| 8. | Gongdin á útlendingaøkinum í Føroyum | 15 |
| 9. | Hví er neyðugt at hava eina integrasjónsskipan? | 17 |
| 10. | Integrasjónsfremjandi átøk | 19 |
| 11. | Samskipan av integrasjónsøkinum | 20 |
| 12. | Tulkatænasta | 21 |
| 13. | Byrjanarundirvísingarskeið fyri vaksin í føroyskum og um Føroyar | 22 |
| 14. | Børn í skúlaaldri | 23 |
| 15. | Børn undir skúlaaldur | 25 |
| 16. | Høvuðsavbjóðingin við at skipa fyri byrjanarundirvísing | 26 |
| 17. | Undirvísingin skal enda við eini próvtøku | 29 |
| 18. | Treytir í sambandi við ikki-tíðarbundið loyvi | 31 |
| 19. | Bólkar, ið serligar skipanir kunnu verða gjørdar til | 32 |
| 20. | Skal skipanin verða sjálvboðin ella kravd? | 33 |
| 21. | Hvussu verður undirvísingin fíggjað? | 34 |
| 22. | Kann skipanin hvíla í sær sjálvari? | 35 |
| Skjal 1. | Integrasjónspolitikkur í Norðurlondum | 36 |
| Skjal 2. | Alment um flóttafólkaøkið í Føroyum | 45 |
| Skjal 3. | Útlendingar og uppihald | 48 |


Heiti: Integrasjónsálit • Útgevari: Innlendismálaráðið 2011 • Útgáva, 1. upplag, 50 eintøk • Málslig gjøgnumgongd og uppsetan: Sprotin • Prent: Prenta • Talgild útgáva (PDF fíla) kann takast niður av heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum • Um tilfar í hesi frágreiðing verður endurgivið, skal vísast til útgávuna.

# 1. Formæli

Útlendingar eru ein sjálvsagdur partur av okkara samfelag og eitt ríkt tilfeingi, ið rúmkar okkara vitan og kunnleika á ymsan hátt. Tað setir okkum sjálvum krøv og mennir okkum sum samfelag. Vit eru fáment og okkum tørvar menniskjaligt tilfeingi.

Umráðandi er, at teir útlendingar, ið flyta til Føroya, fáa høvi at geva sítt íkast til samfelagið á ein týðandi hátt. Tá ið vit eggja teimum til at vera við og virka í samfelagnum, fáa vit økt virknið í samfelagnum, og tað verður okkum til stóran fyrimun.

"Integrasjón" er nýtt hugtak í Føroyum. Vit hava til dømis einki viðurkent føroyskt orð fyri "integrasjón". Hugtakið "integrasjón" fevnir um at savna fleiri partar í eina eind. Integrasjón í samfelagsligum samanhangi er ein tilgongd, sum skapar felags grundarlag hjá bólkum ella fylkingum at liva lið um lið.

Upprunin til orðið "integrasjón" er leitt av latínska sagnorðinum "integrare", ið merkir "gera heilt ella fullkomið" ella "endurnýggja" og sum gongur aftur til lýsingarorðið "integer", ið merkir "heilur" ella "óskalaður".

Føroyamálsdeildin á Setrinum hevur skotið upp, at eitt føroyskt orð fyri integrasjón kundi verið: "sameining", "tillaging", "innlaging" ella "samlaging".

Men hvat vilja vit við einari føroyskari integrasjón? Vilja vit, at útlendingurin skal laga seg til føroyska samfelagið, uttan tó at sleppa sínum eyðkennum? Skal útlendingurin lagast inn í føroyska samfelagið ella skal tann einstaki útlendingurin og samfelagið laga seg hvørt eftir øðrum - samlagast? Ætla vit, at útlendingurin skal sleppa sínum eyðkennum og gerast líkari ella heilt líkur føroyingum, er talan ikki um integrasjón, men um assimilasjón.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki tikið støðu til eitt føroyskt orð fyri integrasjón, men tó er semja um, at hugtakið "integrasjón" skal fevna um fyribrigdið: at einstaklingurin og samfelagið skulu laga seg hvørt eftir øðrum. Ein væleydnað integrasjón hevur við sær, at útlendingar fáa høvi at virka í vinnulívinum, í frítíðar- og mentanarlívinum á jøvnum føti við aðrar føroyingar. Tað hevur stóran týdning, at integrasjónin fer fram við fyriliti fyri føroyskari og útlendskari siðvenju og mentan soleiðis, at útlendingurin ikki missir sín egna samleika.

„Integrasjón“ er nýtt hugtak í Føroyum. Vit hava til dømis einki viðurkent føroyskt orð fyri „integrasjón“. Hugtakið „integrasjón“ fevnir um at savna fleiri partar í eina eind. Integrasjón í samfelagsligum samanhangi er ein tilgongd, sum skapar felags grundarlag hjá bólkum ella fylkingum at liva lið um lið.

# 2. Um integrasjónsálitið

Annika Olsen, landsstýriskvinna, setti á vári 2010 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ein integrasjónspolitikk í Føroyum.

Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Innlendismálaráðið, Útlendingastovuna, Mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Kommunusamskipan Føroya, Føroya Kommunufelag, Løgregluna og útlendingaumboð.

Tá ið arbeiðið í bólkinum var komið eitt sindur áleiðis og farið varð at tosa um, hvørji tiltøk kundu verða sett í verk fyri at hava eina skipaða integrasjón, metti arbeiðsbólkurin, at neyðugt var, at arbeiðsgevarar vóru umboðaðir í bólkinum, tí nógv av tiltøkunum viðvíktu arbeiðsgevarunum. Bólkurin heitti tí á Vinnuhúsið um at velja eitt umboð.

## Í arbeiðsbólkinum hava hesi umboð sitið

Gunnvá S. á Lofti,
*ráðgevi, Innlendismálaráðið, forkvinna*
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe,
*fulltrúi, Innlendismálaráðið (til september)*
Súsanna Nordendal,
*fulltrúi, Almannamálaráðið*
Bergur Berg,
*ráðgevi, Mentamálaráðið*
Gurið Joensen,
*stjóri, Útlendingastovan*
Bette Johansen,
*málsviðgeri, Útlendingastovan*
Bergmann Finnsson,
*ráðgevi, Føroya Kommunufelag*
Jancy Biskupstøð Klein,
*leiðari, Kommunusamskipan Føroya*
Kalpana Vijayavarathan,
*lektari, útlendingaumboð*
Velko Gjorgjieski,
*arbeiðsformaður, útlendingaumboð*
Karen Marie Olesen,
*Fúti*
Esther Dahl,
*ráðgevi, Vinnuhúsið (frá oktober)*

## Arbeiðssetningurin frá landsstýriskvinnuni var hesin:

- Hvat verður gjørt í Íslandi, Danmark, Noregi, Svøríki og Finnlandi at integrera fremmandafólk, sum flyta til landið.

- Hvørjar eru royndirnar aðrastaðni við integrasjón? Er kannað, hvønn týdning skipað integrasjón hevur? Fyrimunir og vansar.

- Eru royndirnar ikki einsháttaðar, hvør er orsøkin til tað, og hevur tað týdning, hvussu integrasjónin verður løgd til rættis.

- Persónsskari: Hvønn skal integrasjón í Føroyum vera til? Til allar útlendingar, sum koma til landið? ella skulu ymsar skipanir verða gjørdar til teirra, sum bara koma til landið eitt stutt skifti at arbeiða, og tey, sum ætla at verða verandi?

- Skal skipanin miða eftir serligum bólkum t.d. kvinnum/monnum/børnum?

- Innihald: Hvat skal integrasjón fevna um: Innleiðsluskeið, málskúla, o.s.fr.

- Skal skipanin vera sjálvboðin ella kravd?

- Skal skipanin vera sjálvboðin, skal onkur áeggjan vera, t.d. onkur fyrimunur við at taka skeiðið?

- Hvar: Hvussu eigur integrasjón at verða skipað? Skal tað vera uppgáva hjá almennum lands- ella kommunustovnum, og/ella kunnu privat feløg eisini vera við.

- Hvat fer tað at kosta at seta integrasjónsskipan í verk? Og hvussu er kostnaðurin býttur út á ymisku yrkisøkini.

- Eru møguleikar at fáa inntøkur, so skipanin kann hvíla í sær sjálvari?

Skjótt gjørdist arbeiðsbólkinum greitt, at royndirnar í okkara grannalondum ikki eru heilt sambærligar við føroysk viður-

skifti. Útlendingar, ið koma til Føroya, eru í høvuðsheitum útlendingar, ið verða sameindir við ein føroying, og útlendingar, ið koma til Føroya at arbeiða, umframt makar og børn teirra.

Bólkurin av útlendingum í okkara grannalondum, er breiðari og fevnir eisini um flóttafólk, og nógv meira um útlendingar, ið verða sameindir við aðrar útlendingar. Av tí at flóttafólk ikki eru í Føroyum nú, og avbjóðingin at integrera tey er ein heilt onnur, kemur arbeiðsbólkurin ikki við uppskoti um, hvussu integrasjónin av hesum bólki eigur at verða skipað. Bólkurin hevur í skjali 2 lýst serligu avbjóðingina, tað er, at fáa flóttafólk inn í landið.

Peningur varð ikki settur av til uppgávuna, og hetta darvaði arbeiðnum nakað m.a. hevur arbeiðsbólkurin ikki havt høvi at fáa serfrøðingar úr grannalondum at greiða frá royndunum í teirra londum. Hetta hevur avmarkað, hvussu væl bólkurin hevur kunnað greitt frá royndunum aðrastaðni, og mett um í hvønn mun tær eru sambæriligar við støðuna her.

Torført hevur verið at fáa útvegað skrivligt tilfar úr grannalondunum, ið vísa royndir og kanningar hjá teimum við at integrera útlendingar. Av tí at málbólkarnir fyri integrasjón eru so ymiskir í Føroyum og í grannalondunum, helt arbeiðsbólkurin, at spurningurin um integrasjón í grannalondunum ikki var so alneyðugur til tess at lýsa tørvin á integrasjón í Føroyum. Bólkurin hevur tí ikki gjørt so nógv burtur úr teimum royndum, grannalond okkara hava við at integrera útlendingar.

Fyri at skapa størri samanhang í frágreiðingina fylgir bólkurin ikki spurningunum í arbeiðssetninginum í øllum. Allir spurningarnir eru svaraðir, men ikki í somu raðfylgju, sum teir eru settir.

# 3. Samandráttur

Integrasjónsmál eru oftast viðkvom og trupul. Royndirnar úr grannalondunum eru besta prógvið um tað. Hóast grannalondini hava skipað seg á ymsan hátt, tykist ikki sum um nakað teirra heldur, at integrasjónin nær á námind hevur eydnast væl. Hetta er eitt torgreitt øki.

Í útlendingamálum sæst javnan, at tá ið mál taka seg upp, sum elva til tvørleikar hjá einstaklingum ella bólkum, verða gjørdar ymsar serskipanir til tess at sleppa undan trupulleikum í kjalavørrinum av teimum. Tá ið integrasjónspolitikkurin er endaliga samtyktur, hevur tað alstóran týdning, at reglurnar verða fylgdar til tess at sleppa undan trupulleikum, sum annars fara at taka seg upp, sum frá líður.

Ein væleydnað integrasjón hevur við sær, at útlendingar virka í samfelagnum javnbjóðis føroyskum borgarum, t.e., at útlendingarnir kunnu fáa sær útbúgving, virka í vinnulívinum, í politikki og í frítíðar- og mentanarlívinum eins og føroyingar. Samstundis er tað týdningarmikið, at integrasjónin verður lagað soleiðis, at innflytarin ikki kennir seg kroystan at káma tann samleika, hann hevur frá upprunaligu mentanini. Tí má integrasjónin verða lagað við fyriliti bæði fyri føroyskari og útlendskari siðvenju og mentan.

Arbeiðsbólkurin heldur, at støðan integrasjón viðvíkjandi er alt annað enn nøktandi, og mælir til, at ymisk tiltøk verða sett í verk sum skjótast. Kunnu øll tiltøkini ikki verða framd í einum, verður mælt til, at tiltøkini verða sett í verk eftir 3 árum og í hesi raðfylgju:

### 1. Integrasjónslóg skal verða smíðað

Bólkurin heldur, at stórir fyrimunir eru við at skipa integrasjónspolitikkin í eini integrasjónslóg. Við eini integrasjónslóg eru allar ætlanirnar ásettar í lógini – onki ivamál er um, hvør ætlanin er, og hvussu viðurskiftini skulu verða skipað. Við eini integrasjónslóg hava landsins myndugleikar bundið seg til at fáa ásettu skipanirnar at virka, og peningur má verða játtaður, so skipanirnar kunnu fáast at virka. Tí hava landsins myndugleikar eisini skyldu at halda lógina og fylgja henni.

Ein annar fyrimunur við at hava eina integrasjónslóg er, at útlendingar fáa betri møguleikar at kunna seg um rættindi og skyldur og fáa at vita, hvørjar sanksjónirnar eru, um lógin ikki verður hildin. Lógin skal vera greið og ikki geva innflytarum falskar vónir, ið kunnu elva til tvørleikar, sum bæði sosialt og fíggjarliga fara at kosta Føroyum dýrt.

### 2. Samskipari verður settur

Arbeiðsbólkurin mælir til, at samskipari verður settur at geva ymisku myndugleikunum ráð um integrasjón og tryggja at nevndu tiltøk, ið arbeiðsbólkurin mælir til verða sett í verk, stuðla upp undir hvørt annað og verða ment so hvørt. Her kundi t.d. verið hugt at íslendsku skipanini, sum hevur ein stovn, Fjølmenningasetrið, til m.a. at kunna útlendingar um teirra rættindi í Íslandi og at skapa sambond millum útlendingar. Tá ið t. d. lógir og mannagongdir, ið onkursvegna ávirka útlendingar, verða skipaðar, hevur stovnurin stóran týdning sum ráðgevi. Kommunur hava eisini møguleika at venda sær til Fjølmenningasetrið og leita sær ráð, tá ið nógvir útlendingar koma til kommunurnar.

Samskiparin skal eisini takað sær av kunnandi tilfari til nýkomnar útlendingar.

Niðanfyri eru nøkur uppskot, hvussu staðbundið integrasjónsarbeiðið kann fara fram.

- Kunning til útlendingin – hvat finnur tú hvar í kommununi, hvørji eru tíni rættindi?
- Dagstovnar, skúli, val og møguleiki at stilla upp. Møguleiki hjá kommunum og Útlendingastovuni at samstarva um tað.
- Læra føroyskt, skapa fólkaræðiliga fatan, læra um okkara vanar. Kundi kanska verið á kvøldskúlastigi, kanska sum felagsundirvísing fyri fleiri kommunuøki. Umráðandi er, at arbeiðsplássini eggja fólki at fara á hesi skeið.
- Vera við at skapa borgarabólkar í kommununi, sum kunnu leiðbeina útlendingum. Kommunan kann síggja til at seta bólkarnar, veita høli og ráðgeva og fáa samstarv í lag við arbeiðsplássini.
- Møguleiki er eisini at brúka ítróttarfeløg og onnur áhugafeløg, til at skapa sosialt netverk.

### 3. Byrjanarskeið skal verða fyriskipað

Arbeiðsbólkurin mælir til at skipa eitt kravt byrjanarskeið fyri útlendingar í Føroyum. Á byrjanarskeiðnum skal útlendingurin m.a. læra føroyskt, um føroyska mentan og um føroyska samfelagið. Bólkurin mælir til, at skeiðið skal vera staðið, áðrenn til ber at fáa uppihaldsloyvi, sum ikki er tíðarbundið. Bólkurin mælir eisini til, at Mentamálaráðið í samstarvi við Innlendismálaráðið ger námsætlanir fyri hvørt skeiðið sær, ásetir krøv til undirvísingartilfarið og ger av, hvørjar førleikar tey, sum undirvísa í hesum lærugreinum, skulu hava.

Mentamálaráðið skal sum undirvísingarmyndugleiki í framhaldi av námsætlanunum – saman við útlendingarmyndugleikunum, ið hava eftirlit við útlendingunum, tá ið søkt verður um ikki-tíðarbundið loyvi – gera av, hvørji krøv skulu verða sett próvtøkuni.

### 4. Eyka undirvísing í fólkaskúlanum

Sambært § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini kunnu næmingar, ið hava føroyskt sum annað mál, í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing í føroyskum. Neyvari reglur eru ikki ásettar í kunngerð um undirvísing í føroyskum máli, men sambært siðvenju hjá Mentamálaráðnum fáa næmingar, ið hava føroyskt sum annað mál, boðið 20 undirvísingartímar.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at nýggj føst skipan verður gjørd um eyka undirvísing í føroyskum til næmingar í fólkaskúlanum, sum hava føroyskt sum annað mál. Eyka undirvísingin skal verða sett í verk samstundis sum byrjanarskeiðið verður bygt upp.

### 5. Átøk í mun til børn undir skúlaaldur

Týdningarmikið er, at børn, ið hava føroyskt sum annað mál, so tíðliga sum til ber fara at nýta føroyska málið. Tess fyrr børnini byrja at nýta málið, tess betur verða tey fyri málsliga og minni tørv hava tey á málundirvísing, tá ið tey verða meira tilkomin.

Umhugsað kundi verði at gjørt eina skipan, ið ásetir, at Gigni kann fara á heimavitjan hjá nýkomnum útlendingum, ið hava børn við til Føroya, á sama hátt sum skipanin virkar í dag, tá Gigni kemur á heimavitjan hjá nýggjum foreldrum. Við hesi heimavitjan kann Gigni eggja foreldrum at lata barnið fara á dagstovn, so barnið fær møguleika at nýta føroyska málið so tíðliga sum gjørligt.

Í fólkaskúlalógini er heimild til at tvímælt børn, ið hava annað móðurmál enn føroyskt, og sum ikki hava byrjað skúlagongdina, kunnu fáa stuðul til frama fyri málsligu menningina í føroyskum máli. Nærri reglur eru ikki ásettar um hetta undirvísingartilboð, og dømir finnast ikki um, at slík undirvísing er sett í verk.

Bólkurin mælir til, at m.a. hesi tilboð verða sett í verk, so børnini so tíðliga sum til ber koma at læra føroyska málið.

### 6. Tulkatænasta skal verða skipað

Fleiri myndugleikar hava víst á, at tørvur er á tulkatænastu. Samskiftistrupulleikar gera ofta um seg, tá ið útlendingur skal til samrøðu hjá einhvørjum føroyskum myndugleika. Ein tulkatænasta kann verða stór hjálp hjá báðum pørtum.

### Fígging

Mett verður at málundirvísing til vaksin, umleið 100 klokkutímar í føroyskum og umleið 50 klokkutímar um samfelagsviðurskifti, kemur at kosta umleið 1.8 milliónir kr. um árið. Hesin kostnaður er uttan høli og undirvísingartilfar. Eykaundirvísingin í fólkaskúlanum verður leysliga mett til at kosta umleið 4,4 milliónir kr. Í hesi metingini verður roknað við umleið 90 næmingum, sum í miðal hava tørv á 3 tímum um vikuna.

Neyðugt er sum skjótast at gera undirvísingartilfar til byrjunarskeiðini. Ilt er at meta um kostnaðin av at framleiða undirvísingartilfar, tí forkunnleikin um økið er lítil.

At seta á stovn eina samskipanarfunktión verður mett til at kosta umleið 1 millión kr. Tá skipanin er byrja at virka, verður hon væntandi bíligari.

Ilt er at siga, hvat tulkatænastan fer at kosta, tí kostnaðarmetingin má gerast, alt eftir hvussu skipanin skal virka.

Av tí at so sera nógv viðurskifti eru ókend, og ilt er at spáa um, hvussu skjótt ferð kann verða sett á ymsu økini, verður mælt til eina trý ára royndarverkætlan. Soleiðis ber til at fremja integrasjónsætlanina í stigum, so hvørt sum tiltøkini verða bygd upp.

# 4. Integrasjónsavbjóðingin í dag

Øll londini í vesturheiminum hava nú á døgum eina stóra avbjóðing, tí tey skulu orða ein integrasjónspolitikk, ið skipar viðurskiftini hjá flóttafólki og útlendingum í landinum. Politikkurin skal verða við til at fáa útlendingar at verða meira við í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum.

Hvussu væl hetta hevur hepnast í ymsu londunum, sum borið verður saman við, lýsa vit stutt niðanfyri. Fyri ein part fyri at lýsa hvørjar reglur, grannalond okkara hava á integrasjónsøkinum, og fyri at finna útav, um vit í Føroyum kunnu læra nakað av hinum londunum, tá ið ræður um at integrera útlendingar.

Vit bera saman við Danmark, Svøríki, Noreg, Finnland og Ísland. Tey eru øll nútíðarlig og fólkaræðislig samfeløg við fríum marknaðarbúskapi, men londini hava ymiskar siðvenjur á útlendingøkinum og ymiskar mátar at reka vælferðarsamfeløgini. Tað merkir, at politiskur íblástur kann verða fingin úr øllum londunum, vit bera saman við, men hugsað verður alla tíðina um, hvussu einstøku tiltøkini kunnu virka í Føroyum.

Kortini eru nógvir felagsnevnarar í integrasjónspolitikkinum fyri hesi londini. Á fleiri økjum eru grundreglurnar næstan eins.

Á teimum økjum, har stórur munur er millum londini, er tað oftast í Danmark, at lóggávan er kravmiklari. Serliga tá ið ræður um rættin til familjusameining og í nøkrum førum eisini, tá ið ræður um treytirnar fyri at fáa ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi og treytirnar fyri at gerast ríkisborgari.

## 4.1. Krøv til útlendska arbeiðsmegi

Ongi lond loyva útlendskari arbeiðsmegi fría atgongd. Øll londini, vit sammeta okkum við, hava strangar treytir fyri hesa sonevndu búskaparligu innflyting.

Nógv Vesturevropisk lond tóku nógva ófaklærda arbeiðsmegi inn fyri 30-40 árum síðan; men sum frá leið stóðust eyðsýndir samfelagsligir trupulleikar av hesum – serliga í sambandi við familjusameiningar til upprunaliga innfluttu arbeiðsmegina – so í dag vita vit bara um Føroyar, sum tekur ófaklærda arbeiðsmegi inn. Flestu londini hava serligar reglur, ið loyva serligum serfrøðingum (KT fólki, læknum o.ø.) lættliga inn í landið til tess at skunda undir búskaparliga menning í landinum.

Vert er tó at geva gætur, at flestu evropisku londini eru í ES/EBS-skipanini. Við henni eru øll hesi londini í grundregluni ein felags arbeiðsmarknaður, og tí í eini heilt aðrari arbeiðsmarknaðarstøðu enn Føroyar. Ófaklærd arbeiðsmegi hevur frítt at fara millum "gomlu" EBS-londini, og eisini ófaklærd arbeiðsmegi úr eysturevropisku londunum (láglønarlond, lutfalsliga) kann arbeiða í "gomlu" EBS-londunum, tó við ávísum avmarkingum og eftirliti í flestu londunum.

## 4.2. Skandinaviska vælferðarsamfelagið og innflytan

Grundreglan í skandinaviska vælferðarsamfelagnum um, at allir borgarar skulu sleppa eins væl fram at almennum veitingum, riggar illa saman við, at landamørkini eru opin. Skandinavisku londini hava høga minstuløn og lutfalsliga høgar almennar veitingar til øll, sum ikki fáa arbeiði ella ikki kunnu arbeiða. Tað merkir, alt annað líka, at tað gerst alsamt meira lokkandi hjá flóttafólki og innflytarum at søkja um at sleppa inn í hesi lond. Tað merkir eisini, at økt innflyting av lágútbúnari arbeiðsmegi kann fáa serliga stórar samfelagsbúskaparligar avleiðingar í londum sum okkara.

## 4.3. Familjusameining

Reglurnar fyri at fáa familjusameining eru sera ymiskar í hesum londunum. Danmark er tað landið, ið setir strangastu treytirnar fyri at fáa familjusameining og er tað serliga á trimum økjum, at donsku reglurnar eru strangari.

1. Persónsskarin: Í Danmark eru tað bara hjúnafelagi, sambúgvandi og ómyndug børn, ið kunnu fáa familjusameining. Svøríki og Finnland loyva í serligum førum eisini øðrum enn omanfyri nevndu at fáa familjusameining.

2. Aldurskrav: Danska lóggávan ásetir, at báðir partar skulu verða yvir 24 ár, skulu tey lúka treytirnar at fáa familjusameining til hjúnafelaga. Í Svøríki skulu báðir partar vera yvir 18 ár, og í Finnlandi er einki aldursmark ásett.

3. Tilknýtiskrav til hjún: Við sameining verður kravt í Danmark og í Finnlandi, at hjúnini bæði hava størri tilknýti til ávíkavist Danmark og Finnland, enn til nakað annað land.

Øll londini uttan Svøríki hava okkurt forsyrgjarakrav, tá ið søkt verður um familjusameining við ein hjúnafelaga.

Í øllum londunum kunnu útlendingar verða familjusameind við børn undir lógaldur. Tað merkir í flestu førum børn undir 18 ár.

## 4.4. Ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi

Flestu londini loyva ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi innan 7 ár. Danmark er landið, tað tekur longst tíð at fáa ikki-tíðarbundið loyvi, har tekur tað í minsta lagi 7 ár. Tó hava serliga væl integreraðir útlendingar í Danmark í serligum førum rætt til at fáa ikki-tíðarbundið loyvi eftir 5 ár. Í Finnlandi kunnu útlendingar fáa ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi eftir at hava búð í Finnlandi í 2 ár. Í Svøríki ber til hjá nøkrum útlendingum at fáa ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi beinanvegin, og onnur kunnu fáa ikki-tíðarbundið loyvi eftir 2 árum.

## 4.5. Krøv til ríkisborgararætt

Treytirnar fyri at gerast ríkisborgari eru eins og, tá ið søkt verður um ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi, strangast í Danmark, har tað almenna kravið er, at viðkomandi skal hava búð í ríkinum í minsta lagi 9 ár. Danmark loyvir ikki dupultan ríkisborgararætt, t.e. at útlendingurin er ríkisborgari í Danmark og í gamla heimlandinum samstundis. Til sammetingar loyvir Finnland dupultan ríkisborgararætt og almenna kravið um, hvussu leingi ein skal hava búð í Finnlandi, áðrenn viðkomandi kann verða ríkisborgari, er 6 ár. Øll londini, Svøríki undantikið, seta krøv um mál- og samfelagskunnleika. Svøríki loyvir harafturat dupultan ríkisborgararætt. Møguleiki er at fáa ríkisborgararætt eftir at hava búð í Svøríki í 5 ár.

## 4.6. Innleiðsluskrá – mál og samfelagsviðurskifti

Flestu grannalond okkara hava sett greiðar leiðreglur fyri, hvønn rætt og hvørjar skyldur útlendingar, ið koma til landið, hava í sambandi við integrasjón. Til henda rætt og hesar skyldur hoyrir at vera við í serligum innleiðsluskeiðum, sum eru royndir at fáa útlendingar integreraðar í arbeiðsmarknaðin og undirvísing í máli og samfelagsviðurskiftum.

Í Danmark er innleiðsluskeiðið ætlað bæði flóttafólki og familjusameindum útlendingum. Í Svøríki er innleiðsluskeiðið fyrst og fremst ætlað flóttafólki.

At duga málið í landinum hevur í allarflestu førum sera stóran týdning fyri eina væleydnaða útlendingaintegrasjón. Tí hava øll lond tilboð um málundirvísing.

Í Svøríki og Danmark er málundirvísing samskipaðir partar av innleiðsluskeiðnum fyri nýkomnar útlendingar, og tí er kravt at vera við. Eru fólk ikki við í kravdu málundirvísingini, kann tað hava við sær eina fíggjarliga sanksjón fyri tey, ið fáa hjálp frá tí almenna.

Danmark hevur skipað innleiðsluskeiðið soleiðis, at tað endar við eini próvtøku, har útlendingurin, fyri at gerast ríkisborgari, skal prógva, at hann skilir málið og hevur eina ávísa samfelagsfatan.

# 5. Integrasjónspolitikkur

Avgerandi er, at Føroyar fáa ein politikk, ið tekur útlendingar inn í samfelagið, men samstundis hevur atlit at okkara lítla samfelag. Tann fólkafrøðiliga ójavnvágin, ið kann standast av innflyting, er eitt vandamál, ið samfelagið má taka í størsta álvara. Henda ójavnvágin kann gerast serliga stór á summum plássum, tí nógvastaðni búgva so fá fólk, at bara heilt fáir útlendingar verða ein stórur prosentpartur av øllum, sum búgva í smáu samfeløgunum. Slík íbúgvaviðurskifti gera tað serliga krevjandi at fáa í lag væl eydnaða integrasjón, og spurningurin er, um lógin eigur at leggja uppfyri við at heimila, at útlendingamyndugleikar, almannamyndugleikar og kommunur í serligum førum kunnu seta serlig tiltøk í verk.

## 5.1. Útlendsk luttøka í føroyskum kommunalpolitikki

Tá ið talan er um integrasjónspolitikk, er ein av stóru avbjóðingunum hjá okkum eins og hjá londunum kring okkum at ansa eftir, at grundleggjandi demokratisk rættindi hjá fólki framvegis verða tryggjað. Hesa avbjóðing hava fleiri lond tikið á seg við m.a. at tryggja útlendingum góðar møguleikar at vera við í tí samfelagi, teir eru komnir til. Í fyrstu atløgu er talan um staðbundna samfelagið, har øll londini kring okkum hava givið øllum fastbúgvandi útlendingum valrætt og valbæri til kommunuval nú.

Danmark skrivaði í 1992 undir Strassburg sáttmálan[1]. Sáttmálin varð settur í gildi í mai 1997. Sáttmálin bindur partarnar til at tryggja útlendingum somu rættindi, sum teirra egnu borgarar hava, so sum talufrælsi og fundarfrælsi. Eisini áleggur sáttmálin pørtunum at tryggja útlendingum nøktandi kunning um rættindi og skyldur teirra í lokala samfelagnum. Harumframt leggur sáttmálin upp til, at útlendingar fáa valrætt og valbæri til kommunuval, tá ið teir hava verið búsettir í sama landi í 5 ár.

Sum avleiðing av at danir taka undir við Strasbourg sáttmálanum, gjørdi Løgtingið av síðst í 2006[2] at taka undir við eini broyting í vallógini. Við nýggju broytingini í vallógini er nú ásett í § 1, stk. 2, at allir ríkisborgarar úr øðrum londum hava valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.

Til tess at tryggja, at allir útlendingar veruliga kunnu fáa gagn av møguleikanum at verða virknir borgarar í staðbundna samfelagnum hava kommunurnar fingið eina avbjóðing, tí neyðugt er hjá kommununum at arbeiða miðvíst fyri, at kunna útlendingar um sínar valmøguleikar og tryggja teimum eitt gott grundarlag til at kunna taka støðu til kommunalpolitikk.

Skal útlendingur fáa valrætt og valbæri til løgtings- og fólkatingsval á jøvnum føti við aðrar borgarar í Føroyum, er neyðugt, at útlendingurin sigur frá sær sín upprunaliga ríkisborgararætt og skiftir til danskan ríkisborgararætt.

1) Konvention om udlændinges politiske deltagelse på lokalt niveau.

2) Sí løgtingsmál nr. 11/2006. Í 2006 vóru 562 útlendingar yvir 18 ár fastbúgvandi í Føroyum. Norðurlendingar eru ikki taldir við.

# 6. Royndirnar aðrastaðni við integrasjón

Ongi hagtøl eru fyri, hvørja ávirkan útlendinga- og integrasjónspolitikkurin hevur havt í teimum einstøku londunum. Harafturat er ilt at finna sambæriligar kanningar av orsøkini til, at so stórur munur er á. Greitt er, at summir útlendingar klára seg væl og eru væl integreraðir í teimum ymisku londunum, hjá øðrum eydnast tað munandi verri. Eitt nú er líkt til, at greiðir landafrøðiligir munir eru, soleiðis at skilja, at útlendingar úr ávísum økjum standa seg munandi betur enn tey innbornu at døma eftir flestu tøku hagtølunum (so sum tøl um yrkisluttøku, miðalinntøku, tørv á almannaveitingum og framdum brotsgerðum), men líkt er til, at útlendingar aðrastaðni frá standa seg munandi verri enn tey innbornu eftir somu hagtølum at døma.

Kanningar, hví so stórur munur er á, og hvussu integrasjónstiltøkini virka, skulu m.a. hava fyrilit fyri einum hópi av viðurskiftum, sum útlendinga- og integrasjónspolitikkurin ikki kann ávirka ella bara fyri ein part kann ávirka. Tað veri seg m.a. munurin millum vónirnar hjá útlendingum, ið flyta til londini, munurin millum áskoðanirnar hjá landsins borgarum á útlendingar og munurin millum samfelagsbygnaðin í londunum.

Ein gjøgnumgongd av útlendinga- og integrasjónspolitikkinum í ymsu londunum vísir, at ilt er at finna eitt sannførandi svar um, hvussu integrasjónstrupulleikarnir skulu verða loystir.

Seinastu 10 árini hava næstan øll tey stóru londini í Evropa samtykt nýggjar integrasjónslógir. Lógirnar hava havt við sær størri krøv til integrasjón fyri at fáa ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi og fyri at fáa rætt til politisk og almen rættindi (sosial rættindi). Nýggjur týdningur tykist við hesum at verða lagdur í íntegrasjónshugtakið - frá at vera ein felags integrasjón til nú at umfata alt fleiri krøv um meira einsæris mentanarliga tillaging til samfelagið. Hesar broytingar eru so feskar, at ikki ber til at siga nakað um royndirnar við teimum. Flestallar sosiologiskar kanningar benda á, at krøv um einsæris mentanarliga tillaging til samfelagið ikki fremja integrasjónina, men heldur firra útlendingar. Integrasjón er tó eisini fyri stóran part ein spurningur um støðuna, sum tey innbornu yvirhøvur hava mótvegis útlendingum, og tí er kanska hugsandi, at broytingarnar kunnu hava fremjandi árin á integrasjónina – ikki tí at hon er skilagóð í mun til útlendingar, men tí at tey innbornu fata hana sum rættvísari. Sum er, eru útlendingatrupulleikar ikki eitt politiskt evni í Føroyum, og tí kann valla nøkur orsøk vera til at hugsa um líknandi strong tiltøk her.

Fyrimunur við teirri svensku skipanini er fyri útlendingin, at hann beinanvegin fær somu rættindi, sum allir aðrir borgarar í landinum. Í hinum londunum verða fleiri krøv sett útlendingi, áðrenn hann fær somu rættindi.

Vansin við teirri svensku skipanini kann vera, at hon kann fáa landsins borgarar at gerast útlendingafíggindaligir, tí útlendingar koma til landið og fáa beinanvegin somu rættindi, sum tey innbornu, uttan at samfelagið tryggjar sær, at útlendingarnir hava førleikar til at geva samfelagnum síni íkast á sama hátt sum tey innbornu.

# 7. Lýsing av útlendingaøkinum í Føroyum

## 7.1. Útlendingamál er felagsmál.

Útgangsstøðið í útlendingalógini er, at tað er ikki loyvt frítt at flyta til Føroya. Tað merkir, at útlendingar skulu hava serstakt loyvi til at koma inn í landið. Ríkisborgararætturin er avgerandi fyri hvat loyvi, ið krevst.

## 7.2. Lóggáva á útlendingaøkinum:

Anordning nr. 182 frá 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven.

Bekendtgørelse nr. 636 frá 7. juni 2010 om udlændinges adgang til Færøerne.

Lov nr. 462 frá 17. juni 2008 for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse (ES lógin er óvirkin í løtuni).

### 7.2.1. Norðurlendingar:

Norðurlendingar eru undantiknir og kunnu búseta seg og arbeiða frítt við ongum loyvi. Tó kunnu norðurlendingar verða útvístir eftir revsilógini.

## 7.3. Loyvi:

- Visum
- Uppihaldsloyvi:
  - Familjusameining
  - Arbeiðs- og uppihaldsloyvi
  - Friðskjól til flóttafólk

### 7.3.2. Visum:

Visum er galdandi fyri ítøkilig endamál so sum frítíð, ráðstevnu ella handilsmessu. Visum er í gildi upp til 3 mánaðir.

### 7.3.3. Familjusameining:

Familjusameining verður givin við atliti at familjuviðurskiftunum hjá umsøkjaranum.

- Treytin er, at umsøkjarin hevur hjúnafelaga ella samlivandi, foreldur ella børn, ið búgva fast í Føroyum.
- Tann fastbúgvandi kann vera annaðhvørt føroyingur, norðurlendingur ella útlendingur.

Familjusameining verður givin sum eitt tíðarbundið loyvi, við atliti at ikki-tíðarbundnum loyvi.

### 7.3.4. Arbeiðs- og uppihaldsloyvi:

Arbeiðs- og uppihaldsloyvi verður givið við atliti at tørvinum hjá samfelagnum.

Sbrt. § 9, stk. 2, nr. 4 skal tað vera:

væsentlige beskæftigelsesmæssige eller erhvervsmæssige hensyn, der taler for at imødekomme ansøgningen.

- Tí eru tveir møguleikar at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi eftir § 9, stk. 2, nr. 4
  - Umsøkjarin hevur serligan førleika, sum tørvur er á.
  - Er talan um ófaklærd, skal almennur tørvur vera á arbeiðsmegi.
- Arbeiðs- og uppihaldsloyvið er tíðarbundið í 1 ár í senn við atliti at einum fyribils uppihaldi.

### 7.3.5. Ítróttaravtalan:

Ítróttaravtalan er ein avtala millum Innlendismálaráðið og Ministeriet for Flygtninge, Indvandrere og Integration.

Ítróttarfólkið fær ítróttarloyvi, ið samstundis heimilar viðkomandi at arbeiða eitt sindur við síðuna av ítróttinum.

### 7.3.6. Ikki-tíðarbundið loyvi:

Útlendingur, ið er *familjusameindur*, kann søkja um ikki-tíðarbundið loyvi eftir 3 ár. Treytirnar, ið settar verða fyri at fáa ikki-tíðarbundið loyvi, eru, at tann familjusameindi og makin skulu verða samlivandi ella sambúgvandi, viðkomandi skal ikki vera revsaður og ikki skylda tí almenna nakað.

Útlendingur, ið er í Føroyum við *arbeiðs- og uppihaldsloyvi*, kann søkja um ikki-tíðarbundið loyvi eftir 7 ár. Treytirnar, ið settar verða fyri at fáa ikki-tíðarbundið loyvi, eru, at viðkomandi skal hava eitt arbeiðstilboð, ikki vera revsaður og ikki hava skuld til ta almenna.

Útlendingurin skal harafturat til eina integrasjónssamrøðu, har viðkomandi m.a. skal prógva, at hann klárar at samskifta á føroyskum og ella á øðrum skandinaviskum máli, sum viðkomandi klárar seg við í Føroyum, og at hann annars er virkin í samfelagnum.

### 7.3.7. Friðskjól:

Tann, sum hevur verið fyri álvarsligum mannarættindabrotum ella brotum á humaniteru rættindini síni, og sum tí noyðist at flýggja undan ítøkiligum hóttanum móti lívi, heilsu og grundleggjandi mannarættindum, tí at heimlandið ikki verjir hesi rættindi, skal verða viðurkendur sum flóttafólk í Føroyum, eru Føroyar fyrsta trygga landið, hann kemur til ("eintingisflóttafólk"). Harafturat hava øll lond skyldu til, eftir áheitan frá UNHCR (ST hákommiserinum um flóttafólk), at taka sín part av flóttafólki, sum UNHCR hevur tikið undir fyribilsvernd sína sum flóttafólk (kvotaflóttafólk)

Serstakliga fá fólk hava søkt um friðskjól í Føroyum, og at kalla øll eru send aftur til annað trygt land.

Føroyar hava ikki skyldu mótvegis altjóða samfelagnum at taka móti flóttafólki. At taka móti flóttafólki er serstakliga kravmikið, og spurningurin er, um Føroyar skulu taka økið á seg saman við útlendingamálum annars.

Neyvari umrøða av flóttafólkaøkinum er í skjali 2.

### 7.3.8. Altjóða rættarligar avtalur, ið eru viðkomandi fyri útlendingarættin í Føroyum:

Føroyar eru bundnar av mannarættindasáttmálum, og tí er avmarkað lóggávuheimild galdandi á økinum, tí at lóggávan í landinum altíð má samsvara við altjóða lóg.

Harafturat hevur Danmark bundið seg til fleiri millumtjóðasáttmálar, ið hava týdning á útlendingaøkinum, og tað hevur væntandi eisini týdning fyri Føroyar.

Neyvari upplýsingar um, hvørjar sáttmálar talan er um, eru í skjali 1 undir punktinum um Danmark.

# 8. Gongdin á útlendingaøkinum í Føroyum

Útlendingar búsitandi í Føroyum eru ein sera fjølbroyttur skari av fólki úr nógvum ymiskum londum. Sambært Hagstovuni búðu 1. januar 2010: 883 fólk í Føroyum, sum ikki høvdu danskan ella annan norðurlendskan ríkisborgararætt. Hesir persónar komu úr 85 londum.

Endamál teirra við uppihaldinum í Føroyum kann vera ymiskt, men sum heild verða uppihaldsloyvini hjá útlendingum bólkað í arbeiðs- og uppihaldsloyvi og uppihaldsloyvi sum familjusameind.

Hagtølini sambært journalunum hjá Innlendismálaráðnum og Útlendingastovuni fyri tíðarskeiðið 2004 – 2010 vísa hesa gongd (ummæld mál): Tølini, ið vanta í yvirlitinum niðanfyri, stava frá, at yvirlitini ikki vóru býtt í 1. umsóknir og umsóknir um ikki-tíðarbundið loyvi fyrr enn í 2009.

### Loyvi til familjusameining:

| | Íalt | 1. ferð | Ikki-tíðarbundið |
|---|---|---|---|
| 2004 | 66 | 20 | |
| 2005 | 100 | | |
| 2006 | 78 | | |
| 2007 | 112 | | |
| 2008 | 113 | 40 | |
| 2009 | 133 | 51 | 25 |
| 2010 | 153 | 55 | 25 |

### Arbeiðsloyvi:

| | Íalt | 1. ferð | Ikki-tíðarbundið | + olju |
|---|---|---|---|---|
| 2004 | 600-700 | | | |
| 2005 | 330 | | | |
| 2006 | 464 | | | 252 |
| 2007 | 730 | | | 593 |
| 2008 (v Es) | 700 | | | 142 |
| 2009 (v Es) | 330 | 199 | 14 | 229 |
| 2010 (v Es) | 248 | 77 | 28 | 409 |

## VINNUGREINAR 2010:

Flestu umsóknirnar eru í hesum vinnugreinum:
Fiskivinna á landi (75 fólk), ítróttarfólk (43), sveisarar (13), kokkar á sjógvi og landi (10), tænastustarvsfólk á sjónum (10), byggivinnan (10), fiskimenn (5).

Í hesum vinnugreinum eru sjáldan fleiri enn ein umsókn til hvørja:
jarðfrøðingar, KT-serfrøðingar, tónleikalærarar, prentarar við serútbúgving, maskinsmiðir, bilmekanikarar, bakarar, urtagarðsfólk, fysioterapeutar/massørar, barnagarðshjálparfólk, reingerðarfólk, uppvaskarar, handilsvinna.

Udlændingeservice avgreiðir umsóknir frá læknum beinleiðis, tí kenna vit ikki tey tølini.

Oljuvinnufólkini eru nógv, men bara tey árini borað verður. Tí siga tey tølini einki alment um, hvørjar vinnugreinar, fólkini søkja til.

Útlendingalógin ásetir tvey metingarstøði, sum kunnu gera, at útlendingurin fær arbeiðs- og uppihaldsloyvi: útlendingurin kann fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi, um avgerandi arbeiðsmarknaðaratlit ella avgerandi vinnulig atlit tala fyri, at umsóknin verður gingin á møti.

Tá ið arbeiði minkar, og tað hevur við sær, at útlendingar, ið eru í Føroyum og arbeiða, eftir reglunum missa arbeiðs- og uppihaldsloyvi, hava serligar loysnir stundum verið gjørdar politiskt fyri hesar útlendingar, soleiðis at teir fáa endurnýggja arbeiðs- og uppihaldsloyvið, ella ikki missa tað, hóast aðalregluligu fortreytirnar fyri hesum ikki hava verið til staðar.

Á heysti 2004, gjørdi Innlendismálaráðið eina avtalu við Ministeriet for Flygtninge, Indvandrere og Integration, um teir útlendingar, ið høvdu arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum fyri 8. september 2004. Avtalan ásetti, at Innlendismálaráðið kundi viðmæla eini umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi "på baggrund af virksomhedens konkrete behov for den pågældende medarbejder og under henvisning til, at der er tale om fortsættelse af et allerede eksisterende ansættelsesforhold". Metingin eftir útlendingalógini varð við hesum sett til viks, tí kravið um at fáa longt arbeiðs- og uppihaldsloyvi var eftir hesi avtaluni, at um útlendingur fær arbeiðstilboð frá einum virki, ið hevur tørv á útlendinginum, og viðkomandi útlendingur hevur arbeitt á virkinum, fær útlendingurin longt arbeiðs- og uppihaldsloyvi, kann hann vísa á, at hann hevur fingið ta løn, honum er boðið.

Í 2008 varð ES skipanin sett í gildi. Henda skipan gav ES borgarum fyrimun fram um aðrar útlendingar, ið nú vórðu "triðjalandsborgarar" í mun til ES borgarar.

Í 2009 varð ES skipanin sett úr gildi, tí arbeiðsloysisprosentið í Føroyum varð komið upp á 3,5 %, ið var markið fyri, nær lógin skuldi verða gjørd óvirkin.

Samstundis sum ES skipanin varð sett úr gildi vórðu avtalurnar frá 2004 og 2008 eisini settar úr gildi. Nýggj skiftisskipan varð gjørd, sum tryggjar øllum, (ikki bara ES-borgarum) sum hava arbeitt í minsta lagi 2 ár í sama arbeiði ella líkum arbeiði, at tey kunnu fáa uppihaldið framlongt við ongari arbeiðsmarknaðarmeting, tí tey verða mett sum serliga skikkað á tí økinum, tey hava nomið sær førleika á.

Tá ið politiska skipanin setir ymsar serskipanir í verk fyri at forða fyri, at teir útlendingar, ið missa arbeiðs- og uppihaldsloyvi noyðast av aftur landinum, kann hon óætlað skapa ein útlendingatrupulleika, ið hevur óbeinleiðis neilig árin á integrasjónina.

Hesin trupulleikin kann t.d. vísa seg á tann hátt, at føroyingar ikki fara at taka so væl ímóti útlendingum, tí teir vanliga koma til Føroya við teirri grundgeving at tørvur er á arbeiðsmegi, men fara ikki avstað aftur, tá ið arbeiðið minkar. Hetta kann elva til trupulleikar bæði fyri útlendingin, ið sleppur at halda fram at arbeiða í Føroyum og fyri útlendingin, ið longu er væl integreraður í føroyska samfelagið.

# 9. Hví er neyðugt at hava eina integrasjónsskipan?

Er integrasjónsskipan í Føroyum, verður lættari at fylgja við og ávirka gongdina hjá útlendingum í Føroyum. Føroyska samfelagið fær sagt útlendingum frá, hvussu tað er at liva í Føroyum, hvat er at bjóða útlendingum í Føroyum, og hvat krevst av teimum. Við integrasjón fáa ólíkar mentanir og fólk betri møguleika at koma í samband hvørt við annað í virðing og við teimum ymisleikum, sum kunnu vera, og á tann hátt kann eisini verða komið nógvum fordómum til lívs.

Sum støðan er, vita vit snøgt sagt onki um, hvussu tað gongst útlendingum í Føroyum, og tað kann vísa seg at elva til trupulleikar í longdini, hyggja vit at, hvussu gingist hevur í hinum londunum.

Fyri at vísa at vit eru eitt framkomið samfelagið, ið er sinnað at halda altjóða reglur, er tað týdningarmikið at hava eina integrasjónsskipan.

Verður persónur ikki integreraður, kann tað enda við, at viðkomandi verður sosialt avbyrgdur. Hevur viðkomandi børn, kann tað gerast uppaftur størri trupulleiki. Útlendingurin og kanska restin av familjuni verður ikki partur av samfelagnum og hevur ikki møguleika at vera við í samfelagnum. Um landið ikki hevur ávís krøv til, at útlendingur skal integrerast, er eyðsýnt, at ein partur av útlendingunum ikki fær fylgt við í samfelagnum, gerst sárbærari, og hevur lítlan og ongan møguleika at kenna síni rættindi og sínar skyldur.

Tá ið integrasjónin millum samfelagið og útlendingin eydnast væl, hevur viðkomandi – kanska serliga tá ið ikki alt gongst eftir vild - betri møguleika at vera sjálvbjargin í samfelagnum og samstundis at bøta lívsgóðskuna.

Føroyar hava tikið undir við CEDAW[3], eisini kallaður "Kvinnurættindasáttmálin".

Hagtøl vísa, at flestu familjusameiningar eru útlendskar kvinnur, ið verða familjusameindar við føroyskar menn, og vísandi til, at vit hava tikið undir við CEDAW, kann ein integrasjónsskipan verða viðvirkandi til, at útlendskar kvinnur verða meira tilvitaðar um síni rættindi.

T.d. kann nevnast, at CEDAW nevndin í 2009 mælti til, at vit í Føroyum fáa eina lóg um harðskap ímóti kvinnum, og at útlendskar kvinnur, sum eru giftar føroyingum og eru fyri harðskapi, verða betur vardar í mun til teirra uppihaldsloyvi.

Skulu Føroyar seta tiltøk og skipanir í verk at røkka ávísum bólkum, í hesum førum útlendskum kvinnum, er tað týdningarmikið, at vit hava eina integrasjónsskipan, ið kann vera við til at geva hesum kvinnunum neyðugar førleikar.

Er ein partur av samfelagnum, í hesum førum útlendingar, ikki integreraður, er talan um nógv tilfeingi, ið full nytta ikki fæst úr. Líkindi verða samstundis til at tey fáa eitt verri lív, og tað virkar bæði aftur á teirra næstringar og á næstu ættarliðini.

Kanningar av skúlanæmingum – eitt nú pisakanningarnar í Føroyum – benda greitt á, at tá ið mamman hevur góða útbúgving, klára næmingarnir seg betur. Ein sera stórur partur av familjusameiningunum her eru kvinnur, ið verða familjusameindar við menn í Føroyum. Skalt tú skilja, hvat fer fram í fólkaskúlanum og hava fortreytir at hjálpa børnunum við skúlatingum, er – sama hvørja útbúgving ein hevur við sær heiman – neyðugt, at tú skilir nakað av málinum og samfelagnum sum heild.

Verða skipanir ikki gjørdar, ið tryggja, at hesar útlendsku mammurnar fáa neyðuga málkunnleikan og samfelagsvitan, er sera stórur vandi fyri, at ikki bara tær, men eisini børnini verða sett til viks í samfelagnum. Hesin vandi er uppaftur størri, um pápin t.d. er sjómaður, ella av øðrum ávum ikki er um barnið í gerandisdegnum, so hann kann vera tí til hjálpar at gera heimaarbeiði.

Ein treyt fyri at hava eina væleydnaða integrasjónsskipan er, at útlendingurin sjálvur vil verða integreraður í samfelagið, og at tey innbornu somuleiðis eru hugað, at útlendingar verða integreraðir við samfelagið. Annars ber ikki til at fáa skipanina til at virka væl, um enn hon kann gera mun kortini.

---

3)The Convention on the Elimination of All Forms of Discrimination Against Women

## 9.1. Staðbundna samfelagið, kommunan og integrasjón:

Tá ið útlendingingar koma inn í føroyska samfelagið koma tey í samband við okkara livihátt, okkara lógir, vanar og óvanar. Hesar reglur, formligar og óformligar, sum vit føroyingar liva eftir, vita tey, sum koma til landið, mangan als einki um.

Formligu reglurnar eru ymsu lógirnar og tey rættindini, føroyingar hava. Óformligu reglurnar kunnu verða lýstar sum tær íbornu, óskrivaðu reglurnar um, hvussu føroyingar eru. Ella í stuttum, hvussu útlendingar sosialt sleppa upp í part í Føroyum.

Báðir bólkar, føroyingar og útlendingar, eiga at læra hvør um annan og læra hvør annan at kenna, til tess at skilja vanarnar hvør hjá øðrum. Umráðandi er, at báðir partar eru við í hesi tilgongd.

Tá ið arbeiðsplássið er undantikið, er samvera millum føroyingar fyri tað mesta saman við familju og vinfólkum. Burtursæð frá størru býunum í Føroyum er ikki vanligt at koma saman á matstovum, kaffistovum, til mentanartiltøk og tílíkt. Tí er ilt hjá útlendingum at sleppa upp í part millum føroyingar. Nógv av tí, ið ger føroyska samfelagið fjálgt og inniligt hjá teimum, sum eru partar av tí, kann fáa útlendsk fólk at fata tað afturlatið og torført at sleppa inní. Tí má verða skipað fyri tiltøkum, sum sleppa útlendingum upp í part, har teir eru staddir.

Í staðbundna samfelagnum og á arbeiðsplássunum eru fyrst og fremst óformligar reglur galdandi, reglur um, hvussu fólk bera seg at á hesum støðum.

Fyri lands- og kommunalar myndugleikar eru formligar reglur galdandi, sum stýra rættindum og ábyrgd hins einstaka. Eisini eru formligar reglur galdandi á arbeiðsmarknaðinum um, hvørji rættindi og hvør ábyrgd, arbeiðsgevari og arbeiðstakari hava hvør fyri øðrum.

## 9.2. Møguleikar á staðnum og í kommununum

Avleiðingar, sum standast av, at føroyingar og útlendingar ikki vita nakað um lívsstílin hvør hjá øðrum og annars ikki koma hvør øðrum við, ber til at arbeiða við í samstarvi ímillum kommununa, vinnuna og áhugabólkar á staðnum.

Integrasjónstilgongd kann verða sett í verk úti um plássini.

Arbeiðsplássið er staðið, har føroyingar og útlendingar hittast og eru saman stóran part av degnum. Arbeiðsplássini eiga tí part av ábyrgdini at virka sum "integrasjónsvøgga", at sjóða føroyingar og útlendingar saman. Okkurt einstakt arbeiðspláss hevur gjørt serliga nógv burturúr at hjálpa til at skapa samband millum útlendingar og tey innbornu á staðnum, og mangan gongur eisini væl at taka ítróttafólk upp í gerandislívið á staðnum. Til ber at læra av hesum royndum og hjálpa at seta gongd á aðrastaðni.

Kommunan eigur at standa fyri mestu kunningini, men arbeiðspláss og áhugabólkar á staðnum eiga at arbeiða við sosialu integrasjónini, tó eisini í samstarvi við kommununa.

Her kunnu kommunan, borgarabólkar og arbeiðsplássini í kommununi arbeiða saman, t.d. at stovna integrasjónsbólk á staðnum, sum so samskipar integrasjónsarbeiðið har á plássinum og skipar fyri átøkum.

Samskiparin, ið bólkurin mælir til verður settur, kann virka sum samskipari í mongu av omanfyri nevndu tiltøkunum. (sí pkt. 11 um samskiparan).

## 9.3. Útlendingar og uppihald

Taka vit støði í tørvspyramiduni hjá sálarfrøðinginum Abraham Maslow[4], f. 1908 – 1970, hevur ein persónur grundleggjandi tørv á m.a. mati, klæðum og vatni. Abraham Maslow setir tørv menniskjans í eina pyramidu og ikki fyrr enn tann mest grundleggjandi tørvur menniskjans er nøktaður, vísir tann næsti tørvurin seg.

Út frá hesi hugleiðing hevur arbeiðsbólkurin í arbeiðnum at integrera útlendingar, hugt nærri at, hvørji rættindi útlendingar hava m.a. sambært almannalóggávu.

Tað hevur víst seg, at útlendingar hava serligar trupulleikar, tá ið teimum tørvar veitingar eftir pensjónslógini. Arbeiðsbólkurin mælir til, at almannaøkið, serliga pensjónsviðurskiftini hjá útlendingum, verða kannað gjølligari. Eisini tørvurin á millumtjóða sáttmálum.

Í skjali 3 verður greitt gjøllari frá økinum: útlendingar og uppihald.

---

4) http://www.abraham-maslow.com/m_motivation/Hierarchy_of_Needs.asp

# 10. Integrasjónsfremjandi átøk

Fyri at fremja integrasjónina á so skynsaman hátt sum tilber, mælir bólkurin til at seta í verk nøkur átøk, ið kunnu vera við til at fremja eina væleydnaða integrasjón.

Ein væleydnað integrasjón vísir seg við, at útlendingar kunnu virka í samfelagnum javnbjóðis føroyskum borgarum, t.e., at útlendingar kunnu fáa sær útbúgving, virka í vinnulívinum, í politikki og í frítíðar- og mentanarlívinum eins og føroyingar. Samstundis er tað týdningarmikið, at integrasjónin verður lagað soleiðis, at útlendingurin ikki kennir seg kroystan at káma tann samleika, hann hevur frá upprunaligu mentanini. Tí má integrasjónin verða lagað við fyriliti bæði fyri føroyskari og útlendskari siðvenju og mentan.

Arbeiðsbólkurin hevur kannað, hvussu hini Norðurlondini skipa sína integrasjónsundirvísing, og bólkurin heldur ikki, at slík skipan kann verða brúkt í Føroyum. Í hinum Norðurlondunum eru undirvísingartilboðini smíðað til at vera so víðtøkin, at tey eisini kunnu hjálpa flóttafólki og fólkum, ið koma úr økjum, har ættbólkar, heldur enn formligar samfelagsskipanir (sum land og kommuna) eru tey sterkastu. Í Føroyum eru ikki eins nógvir útlendingar og í hinum Norðurlondunum, eingi flóttafólk eru í Føroyum, og fá fólk úr ættbólkasamfeløgum. Bólkurin hevur tí hildið, at tað, sum kann geva besta úrslitið í Føroyum, er at gera eina serliga nýggja føroyska skipan, smíðað til føroysk viðurskifti og minni stórætlað enn tær í grannalondunum.

Skulu útlendingar, sum búgva í Føroyum hava møguleika at falla til í føroyska samfelagnum, er neyðugt, at teir fáa møguleika at læra seg føroyskt, læra um samfelagið og um føroysku mentanina.

Bólkurin heldur tað vera týdningarmikið, at útlendingar verða kunnaðir um rættindi og skyldur, tey hava sum búsitandi í Føroyum, og eigur tað at verða ein partur av samfelagsundirvísingini. Kunnað eigur eisini at verða um vanlig gerandisviðurskifti. Tey eru týdningarmikil amboð fyri at kunna vera við og virka í føroyska samfelagnum.

Tá ið útlendingurin skilir málið og veit nakað um samfelagið og mentanina, er lættari at fáa eina betri støðu á arbeiðsmarknaðinum, uttan at vera heftur av ávísum arbeiði ella av at fáa hjálp frá familju og kenningum.

# 11. Samskipan av integrasjónsøkinum

Bólkurin mælir til, at ein integrasjónssamskipari verður settur at samskipa integrasjónina í Føroyum.

Integrasjónssamskiparin skal vera ráðgevi hjá teimum ymisku myndugleikunum, vera við til at tryggja, at tiltøkini, ið ymsu myndugleikarnir seta í verk, stuðla hvørt annað, og at tey áhaldandi verða ment. Eisini skal samskiparin taka sær av kunnandi tilfari til nýkomnar útlendingar.

Sum støðan er í dag, fáa útlendingar uppihaldsloyvi úr Danmark. Ongin føroyskur myndugleiki veit tí júst, hvør útlendingur fær uppihaldsloyvi, og kunningin til nýggjar útlendingar má tí koma frá skrásetingarmyndugleikanum, t.e. frá kommununi. Tað kann t.d. verða gjørt við einum faldara, og við at útlendingurin loyvir kommununi at boða integrasjónssamskiparanum frá, at viðkomandi er fluttur til kommununa.

Tá ið útlendingaøkið verður yvirtikið, fáa útlendingar uppihaldsloyvini úr Føroyum. Tá ber til hjá Útlendingastovuni at senda út kunningartilfar til nýggjar útlendingar saman við uppihaldsloyvinum.

Samskiparin skal hava møguleika at býta út stuðul til ymisk integrerandi tiltøk. T.d. kundi hugsast, at eitt ítróttafelag, eitt virki ella ein skúli ætlar at gera okkurt integrasjónsfremjandi tiltak og kundi søkt um peningaligan stuðul til at fremja tiltakið.

# 12. Tulkatænasta

Eitt av tiltøkunum, ið samskiparin kann verða við til at samskipa, er ein tulkatænasta.

Útlendingar skulu eins og føroyingar til ymsar samrøður, og umráðandi er, at báðir partar skilja hvør annan. T.d. kunnu nevnast samrøður við skúla hjá børnum, barnagarð, lækna, sjúkrahús, rættarhjálp osfr.

Í Føroyum er í løtuni eingin tulkatænasta, ið útlendingar kunnu heita á, og hevur tað ofta verið víst á, at stórur tørvur er á slíkari skipan.

883 útlendingar úr 85 ymiskum londum eru pr. 1. januar 2010 skrásettir í Føroyum, so tað er ikki hugsandi, sum nú er, at hava eina tulkaskipan, ið virkar á øllum málum. Men fekst skipan í lag, ið fataði um mestsum allar bólkar, hevði tað verið stórt framstig hjá útlendingunum í Føroyum.

Bólkurin mælir til, at ein tulkatænasta verður sett á stovn í Føroyum soleiðis, at útlendingar í Føroyum ikki verða settir uttan fyri samfelagið, tá ið samrøður eru við t.d. almennar myndugleikar.

„883 útlendingar úr 85 ymiskum londum eru pr. 1. januar 2010 skrásettir í Føroyum, so tað er ikki hugsandi, sum nú er, at hava eina tulkaskipan, ið virkar á øllum málum.

# 13. Byrjanarundirvísingarskeið fyri vaksin í føroyskum og um Føroyar

Arbeiðsbólkurin mælir til, at byrjanarundirvísingarskeið verður skipað fyri útlendingar í Føroyum. Byrjanarundirvísingarskeiðið skal í fyrsta umfari miðja ímóti at læra útlendingar, búsitandi í Føroyum, føroyskt og kunna tey um samfelagsviðurskifti og mentan í Føroyum. Byrjanarundirvísingin skal vera við til at tryggja, at útlendingar so skjótt til ber fáa eina grundleggjandi innleiðslu í at tosa og skriva føroyskt og grundleggjandi kunnleika um føroyska samfelagið. Undirvísingin skal fevna um 100 klokkutímar í samskifti á føroyskum og 50 klokkutímar um føroysk samfelagsviðurskifti og føroyskar gerandissiðir (tímatalið til teirra, ið hava bestu fortreytirnar). Tey, sum undirvísa, skulu hava lokið serstakt námsfrøðiligt skeið í at undirvísa útlendingum.

Av tí at onki miðvíst arbeiði hevur verið gjørt við at samskipa undirvísingina higartil og seta innihaldslig mál fyri undirvísingina, er onki skipað tilfar og ongin miðsavnað vitan um undirvísing til útlendingar at grunda eitt tilmæli á. Bólkurin setir seg tí ikki føran fyri at mæla til, hvussu undirvísingin í framhaldi av byrjanarundirvísingini eigur at verða skipað; men eyðsæð er, at tá ið byrjanarundirvísingin er farin at virka, er neyðugt at byggja oman á byrjanarundirvísingina við undirvísing á hægri førleikastigum soleiðis, at útlendingar fáa neyðugu førleikarnar til tess at kunna taka miðnámsútbúgvingar, eftirútbúgvingar og framhaldsútbúgvingar eins og øll onnur í Føroyum. Soleiðis kunnu tey byggja sær eina góða støðu á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum annars.

Í endamálsorðingini fyri byrjanarundirvísingina skal verða ásett, hvat útlendingurin í minsta lagi skal læra í byrjanarundirvísingini. Undirvísingin skal verða skipað eins um alt landið og býtt í tvey ella trý torleikastig, alt eftir fortreytunum (so sum móðurmáli, kunnleika um føroyskt frammanundan og útbúgvingarstøði), ið einstøku útlendingarnir hava frammanundan, so at øll fáa á leið somu møguleikarnar at fylgja við í byrjanarundirvísingini og fáa so nógv burturúr, at tey kunnu standa royndirnar.

Týdningarmikið er, at útlendingar fáa greiða kunning um, hvat ið føroyska samfelagið væntar sær av teimum, málkunnleika og samfelagsviðurskiftum viðvíkjandi.

Samstundis er neyðugt, at undirvísingin verður løgd til rættis so skynsamiliga sum gjørligt, bæði kostnaðarliga og reglum viðvíkjandi. Eisini er neyðugt at taka støðu til hvørji løgfrøðilig, búskaparlig og faklig amboð eiga at verða broytt ella bøtt til tess at náa settu málunum. Umframt at gera lóg um integrasjón er vert at hugsa um at laga útlendingalógina til.

Arbeiðsbólkurin mælir ikki til at taka aktiveringsskipan inn í byrjanarskeiðið, sjálvt um aktiveringsskipan er tað týdningarmesta fyri skipaða integrasjón í grannalondunum. Í Føroyum er eingin beinleiðis ábending um, at útlendingar eru, sum kundu notið gott av eini aktiveringsskipan. – Einasti bólkur, ið kanska kundi notið gott av eini aktiveringsskipan, eru teir útlendingar – fyrst og fremst kvinnur – sum eru familjusameindar og eru heimaarbeiðandi. Um ikki maðurin og verfamiljan taka ábyrgdina at hjálpa nýggja familjuliminum inn í samfelagið, kunnu tær gerast ógvuliga einsamallar, marginaliseraðar í føroyska samfelagnum, og hava í roynd og veru mest samband við upprunaliga heimlandið. Ein slík støða er ikki bara sera trupul fyri tær sjálvar, men kann nerva møguleikarnar hjá børnum teirra almikið. Siðvenja er tó ikki at gera aktiveringsskipanir til fólk, ið ikki fáa almannaveiting ella arbeiðsloysisstuðul.

# 14. Børn í skúlaaldri

Sambært fólkaskúlalógini hevur eitt og hvørt barn í skúlaaldri, sum býr í Føroyum, ella sum er her í meira enn 6 mánaðir, undirvísingarskyldu. Gongur barnið ikki í fólkaskúlanum, skal tað fáa undirvísing, ið kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum. Undirvísingarskyldan byrjar í tí ári, barnið fyllir 7 ár, og endar, eftir at barnið hevur fingið regluliga undirvísing í 9 ár. Undirvísingarskyldan endar vanliga í seinasta lagi í tí álmanakkaári, barnið fyllir 17 ár, men hon kann verða longd í serstøkum førum.

Øll børn skulu verða undirvíst í føroyskum øll skúlaárini til og við 9. flokk, og sambært § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini kunnu næmingar, ið hava føroyskt sum annað mál, í hóskandi vavi fáa serstaka undirvísing í føroyskum. Landsstýrismaðurin kann harumframt áseta, at tvímæltum næmingum skal undirvísing í móðurmálinum standa í boði. Landsstýrismaðurin ásetir neyvari reglur um undirvísing av tvímæltum næmingum, og kann hann í hesum sambandi víkja frá t.d. ásetingunum um undirvísing í føroyskum.

Ongar reglur eru ásettar í kunngerð um undirvísing í føroyskum máli, men sambært siðvenju hjá Mentamálaráðnum fáa næmingar, ið hava føroyskt sum annað mál, boðið 20 undirvísingartímar. Tað svarar til somu siðvenju sum í kvøldskúlunum. Heldur ikki eru reglur ásettar í kunngerð um, hvussu nógv kann verða vikið frá ásetingunum í fólkaskúlalógini um kravda undirvísing í føroyskum, tá ið um tvímæltar næmingar ræður.

Bólkurin heldur tó, at bara í heilt, heilt serstøkum førum eigur at kunna verða vikið frá kravdu undirvísingini í føroyskum, tí ein hóskandi málkunnleiki er mestsum altavgerandi fortreyt fyri at kunna taka nakra miðnámsútbúgving her á landi.

Dømi er ikki um, at næmingur, ið hevur føroyskt sum annað mál, hevur fingið undirvísing í móðurmálinum.

Sambært § 4, stk. 3 í fólkaskúlalógini fáa næmingar, ið hava tørv á serligum tiltøkum, ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans, serundirvísing og/ella sernámsfrøðiligan stuðul. Tað er SERNÁM, ið umsitur hesar tímarnar og býtir teir út til skúlarnar eftir næmingatali og tørvi. Undirvísingin til tvímæltar næmingar verður við verandi skipan fíggjað av sama peningi, sum rindar fyri næmingar við sernámsfrøðiligum tørvi annars.

> „Fremsta avbjóðingin hjá børnunum og hjá undirvísingarverkinum er aloftast, at føroyskt ikki er móðurmál teirra, ella at føroyskt ikki er vanliga málið við hús.

Bæði tá ið hugsað verður um tørvin hjá tvímæltum børnum og boðskapin, ið henda skipanin kann tykjast at senda, heldur bólkurin tað hava alstóran týdning, at føst skipan verður gjørd um at tvímælt børn frá skúlabyrjan fáa boðið serstaka undirvísing í føroyskum máli, at talan verður um eitt serstakt, skipað tilboð, ið hevur heimild í § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini, og sum skipanarliga er leyst av sernámsfrøðiligu undirvísingini, ið hevur heimild í § 4, stk. 3. Eyðvitað kunnu børn við útlendskum uppruna hava sernámsfrøðiligan tørv eins og onnur; men fremsta avbjóðingin hjá børnunum og hjá undirvísingarverkinum er aloftast, at føroyskt ikki er móðurmál teirra, ella at føroyskt ikki er vanliga málið við hús.

Neyðugt er at gera eina serstaka skipan og byggja upp eitt lærarатoymi, ið hevur servitan í at undirvísa børnum, ið hava føroyskt sum annað mál. Hetta toymið skal so læra lærararnar, ið skulu undirvísa, og hava yrkisliga umsjón við undirvísingini.

Eykaundirvísingin í føroyskum skal vera serliga lagað og fyriskipað eftir hvørjum einstøkum næmingi, og verða løgd til rættis í neyvari samvinnu við undirvísingartilgongdina í flokkinum annars. Undirvísingin skal innihaldsliga verða løgd upp at undirvísingini í stóru lærugreinunum í flokkinum soleiðis, at verkevni og meginhugtøk ganga aftur.

Eykaundirvísingin skal verða løgd soleiðis til rættis, at hon nervar sum allarminst samveruna við floksfelagar og onnur bæði í og eftir skúlatíð. Hon skal ikki vera, tá ið flokkurin annars hevur tímar, men kann við fyrimuni verða løgd sum framhald av regluligu undirvísingini.

> ” Hvussu stóran tørv, ið einstaka barnið hevur á eyka undirvísing, veldst einamest um aldur barnsins, tá ið tað av álvara kemur í samband við føroyskt.

Í kunngerð um undirvísing í og á teknmáli er ásett, at hoyrandi floksfelagar og lærarar næminganna skulu hava undirvísing í teknmáli og kunnleika til viðurskifti teirra deyvu. Á sama hátt eigur at vera føst, skipað mannagongd, at lærarar og floksfelagar fáa kunning um upprunan og heimlandið hjá foreldrunum at børnum, ið hava føroyskt sum annað mál.

Hvussu stóran tørv, ið einstaka barnið hevur á eykaundirvísing, veldst einamest um aldur barnsins, tá ið tað av álvara kemur í samband við føroyskt. Hevur barnið búð í landinum í fleiri ár undan skúlabyrjan, og hevur tað havt nógv og natúrligt samband við føroysktmælt børn, er tørvurin oftast lítil. Øvut kann tørvur vera á serstakliga nógvari eykaundirvísing, er talan um barn, ið t.d. kemur til Føroya, tá ið tað skal byrja í 6. flokki. – Men mark er tó fyri, hvussu nógvir, ið eyka undirvísingartímarnir kunnu vera, tí skerjir henda undirvísingin høvið at vera saman við javnaldrunum kann tað lættliga gerast steinur oman á byrðu hjá barninum.

# 15. Børn undir skúlaaldur

Týdningarmikið er, at børn, ið hava føroyskt sum annað mál, so tíðliga sum til ber fara at nýta føroyska málið. Tess fyrr børnini byrja at nýta málið, tess betur verða tey fyri málsliga og minni tørv hava tey á málundirvísing, tá ið tey verða meira tilkomin.

Eru børn, ið hava føroyskt sum annað mál, natúrliga saman við børnum, ið hava føroyskt sum móðurmál, ogna tey sær eisini teirra mál, mangan uttan at neyðugt er við undirvísing yvirhøvur. Á dagstovnum ræður tí eina mest um at tryggja, at starvsfólkini ikki av ókunnleika og misskiltari vælvild seta fremmant mæltu børnini uttan fyri felagsskapin í dagstovninum, og onkur vaksin mestsum verður fylgisveinur og millumgongulið, tí tað er ein forðing fyri at málsligu og sosialu førleikarnir mennast natúrliga.

Sambært § 4, stk. 5 í fólkaskúlalógini kann landsstýrismaðurin bjóða tvímæltum børnum, ið hava annað móðurmál enn føroyskt, og sum enn ikki hava byrjað skúlagongdina, stuðul til frama fyri málsligu menningina í føroyskum máli. Ongar reglur eru ásettar, og sambært Mentamálaráðnum er onki dømi um, at slík undirvísing er sett í verk.

Við hesari ásetingini í fólkaskúlalógini kann sigast, at politiski myndugleikin, ið hvussu so er í lógarinnar bókstavi, hevur viðurkent týdningin av at stuðla málmenningina hjá børnum, ið hava annað móðurmál enn føroyskt, og at hesi børnini eiga at kunna verða stuðlað longu, áðrenn skúlagongdin byrjar.

Neyðugt er í kunngerð at skipa fastar karmar um hetta undirvísingartilboð, soleiðis sum lógin letur upp fyri, og at eitt toymi við servitan í at stimbra málmenningina hjá ikki skúlagomlum børnum við øðrum móðurmáli verður skipað.

Eitt, sum er serligt við siðvenjuni á dagstovnaøkinum í mun til í fólkaskúlanum, er, at dagligt samband er millum foreldur og starvsfólk: foreldrini koma inn á dagstovnin, bæði tá ið tey koma við børnunum, og tá ið tey koma eftir teimum. Hetta dagliga samskifti kundi verið nýtt meira medvitað í integrasjónsarbeiðinum – bæði til foreldur og børn.

Eydnast føroyska málmenningin í barnagarðsaldri væl, fær barnið helst ógvuliga lítlan tørv á eyka undirvísing í føroyskum, tá ið tað er komið til skúlaaldurs, so serstakliga nógv er at vinna við at fylgja væl við, og seta hóskandi stuðlandi tiltøk í verk í røttum tíma.

Vert er at hugsa um, hvørt samfelagið átti at stuðlað málmenningini hjá børnum undir skúlaldri og eggja til ella tryggja, at hesi børn hava pláss í kommunalu ansingarskipanini. Sambært § 3 í dagstovnalógini kann kommunan geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt. Heimild er í dagstovnalógini til at kommunan kann veita foreldrum frípláss av fíggjarligum ávum. Til tess at røkka børnum, ið hava tørv á stuðli til málsligu menningina í føroyskum máli, so skjótt sum til ber, kann heimildin í dagstovnalógini verða rúmkað til eisini at fevna um henda bólk, ella ásett verður, at hesum børnum verður tryggjað ansingarpláss soleiðis, at tey verða tikin fram um onnur á bíðilistanum. Tílik heimild kundi eisini verið ásett í eini integrasjónslóg.

Barnaverndartænastan kann við heimild í barnaverndarlógini veita foreldrum frípláss í kommunalari ansingarskipan av sosialum ávum. Endamálið við barnaverndarlógini er at tryggja, at børn, sum liva undir korum, ið kunnu skaða heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð og at hjálpa teimum at fáa ein tryggan uppvøkstur.

Um so er, at talan bara er um at menna føroyska málið, uttan at aðrir sosialir trupulleikar eisini eru í familjuni, kann neyvan sigast, at barnið livir undir korum, ið kunnu skaða tess heilsu og menning. Tó kann Barnaverndarstænastan seta fyribyrgjandi fyriskipanir í gongd, og kann tað, møguliga sum ein fyribyrgjandi fyriskipan, rúmast innan fyri arbeiðsøkið hjá Barnaverndartænastuni, at eggja foreldrum til at tryggja sínum barni nøktandi málsliga menning við t.d. at fáa barnið ansað.

Henda uppgávan kundi eisini ligið á sosialu deildunum. Trupulleikin er bara tann, at ikki allar kommunur hava sosialar deildir. Uppgávan at eggja foreldrum at barni undir skúlaaldur til at stimbra barnið málsliga kundi eisini ligið hjá Gigni. Sambært § 5 í løgtingslóg um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung, kann heilsufrøðingurin, umframt at bjóða børnum undir undirvísingarskyldugan aldur tilboð um fyribyrgjandi og heilsufremjandi heilsukanningar, eisini bjóða foreldrum vegleiðing um heilsu, menning og trivnað hjá barninum. Virksemið hjá heilsufrøðinginum verður vanliga skipað við heimavitjan og foreldraráðgeving, og er talan um eitt tilboð, ið einstøku foreldrini kunnu siga frá sær.

# 16. Høvuðsavbjóðingin við at skipa fyri byrjanarundirvísing

Høvuðsavbjóðingin við at skipa byrjanarundirvísing fyri útlendingar er, at fáa allar útlendingarnar í Føroyum til at læra so mikið, at máltrupulleikar og ókunnleiki til samfelagið ikki eru stórvegis forðingar fyri, at útlendingurin kann liva og virka í føroyska gerandisdegnum, bæði til arbeiðis, á útbúgvingarstovnum og í samfelagnum sum heild.

Sum útgangsstøði eru flestallir útlendingar, búsitandi í Føroyum, áhugaðir í at læra føroyskt, at læra um samfelagsviðurskifti og um mentanina. Hóast góðan vilja og hug til at læra, eru nøkur, ið hava sera ilt við at læra føroyskt, sjálvt um tey hava búð í Føroyum í fleiri ár. Ein av orsøkunum kann vera, at tilboðið um undirvísing í føroyskum ikki hevur verið so gott.

Ein onnur orsøk til at misjavnt gongst við at læra føroyskt, er, at førleikastøðið og fortreytirnar annars hjá útlendingunum, ið flyta til Føroya, eru sera ymisk. Útbúgvingarstøðið er alt frá høgt útbúnum akademikarum til fólk við ongari ella næstan ongari skúlagongd. Eisini málsligu fortreytirnar eru ymiskar: nógv eru úr enskttalandi londum, ella londum, har onnur germansk mál verða talað, mong eru eisini úr romansktmæltum londum, men ein stórur partur er eisini úr londum, har málið er av aðrari rót enn teirri induevropisku, og hóast latínska stavraðið er tað vanligasta, eru eisini mong, ið eru von at nýta onnur skriftttekn. Tískil verður neyðugt at flokka undirvísingina, bæði eftir førleikastigi og eftir læruligum fortreytum annars.

## 16.1. Undirvísingartilboðið til vaksin nú á døgum

Undirvísingartilboðið, ið stendur útlendingum, sum farnir eru um fólkaskúlaaldur, í boði er ikki lógarásett. Undirvíst verður á kvøldskúlunum kring landið, og siðvenja er, at útlendingur hevur rætt til 20 tíma ókeypis undirvísing í føroyskum og kann fáa fleiri tímar fyri gjald.

Undirvísingin verður ikki samskipað kring landið. Av tí at ongin føst skipan er, er heldur ongin námsætlan, og trygd er ikki fyri, at undirvísarar hava ella ogna sær førleikar í at undirvísa í føroyskum sum fremmandamál. Ring líkindi eru til, at undirvísingin eydnast, um undirvíst verður í føroyskum fyri útlendingum á sama hátt sum fyri føroyingum, sum hava føroyskt sum móðurmál. Harafturat hevur tilboðið bara verið 20 tímar, og tað er alt ov lítið til at kunna gera veruligan mun.

Ongin skipað kunning er til útlendingar um, at tey hava rætt til undirvísing í føroyskum. Vantandi kunningin ger, at nógvir útlendingar í Føroyum ikki vita um hetta tilboðið, og tí hava teir ikki verið til undirvísing.

## 16.2. Rætt og skyldu til byrjanarundirvísing

Munurin millum um talan er um rætt ella um skyldu er, at verður skyldan ikki hildin, fær tað fylgjur, t.d. sum at útlendingurin ikki fær ávís rættindi ella missir ávís rættindi. Um landið ásetir tað sum skyldu, at útlendingurin skal fylgja undirvísingini, ella at útlendingurin skal klára eina próvtøku, hevur landið eisini átikið sær skyldu at bjóða undirvísing og próvtøku.

Higartil hevur ikki verið lógarfest krav, at undirvísing í føroyskum skal standa útlendingum í boði. Heldur ikki hevur verið kravt, at útlendingar skulu vera við í undirvísing í føroyskum, men tá ið útlendingur søkir um at fáa ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi, skal hann til samrøðu hjá løgregluni, og har skal hann vísa, at hann hevur ávísan kunnleika til føroyskt ella annað norðurlendskt mál.

Rætturin og skyldan hjá útlendingum, búsitandi í Føroyum, til at fáa byrjanarundirvísing eigur at verða ásett í lóggávu, tí bara um skyldan og rætturin verða løgd føst í lóg, er trygd fyri, at peningur verður til byrjanarundirvísingina. Ikki minst, tí at vandi er fyri, at í fíggjarliga trongum tíðum fer starvsfólka- og fíggjarorka at verða flutt frá sjálvbodnari undirvísing, til tess at onnur lógarkravd undirvísingarmál verða rokkin. Ein annar stórur fyrimunur við lóggávu er, at við henni verður staðfest, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av skipanini.

Kravið um at útlendingar skulu vera við í undirvísingini eigur at verða sett sum krav um, at útlendingur - til tess at umsókn um ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi kann verða tikin til viðgerðar – hevur lokið prógv á førleikastigi, ið samsvarar setninginum í útbodnu undirvísingini, heldur enn sum eitt krav um at fylgja undirvísingini, tí ikki kemst uttanum, at sama hvussu undirvísingin verður løgd til rættis, er hugsandi, at hon kann verða

ein forðing fyri, at útlendingurin t.d. kann taka á seg úrtíðararbeiði ella fyri, at hann kann fylgja aðrari undirvísing.

Verða revsiatgerðir ikki ásettar, um útlendingur ikki tekur prógvið, er skyldan í verki bara ein rættur, sum hin einstaki frítt kann nýta ella lata vera.

Í grannalondunum eru vanligastu revsiatgerðirnar, at útlendingurin annaðhvørt fær skerd rættindi til veitingar ella, at útlendingur ikki fær ávís rættindi eftir útlendingalóggávuni, fyrr enn treytirnar eru loknar.

Sum er, fáa fáir útlendingar almannaveiting, men skulu vit meta eftir gongdini í grannalondunum, kunnu vit vænta, at fleiri útlendingar fáa tørv á almannaveitingum, so hvørt sum fleiri verða familjusameind. Tí verður mælt til at hugsa um at gera tillagingar í almannalóggávuni – og kanska eisini í lógini um arbeiðsloysisskipanina, soleiðis at veitingar verða lækkaðar, til útlendingur hevur staðið prógv í byrjanarundirvísingini.

Viðvíkjandi útlendingalóggávuni verður mælt til, at útlendingur ikki skal kunna fáa uppihaldsloyvi, sum ikki er tíðarbundið (tað merkir: bara fær uppihaldsloyvi í upp til eitt ár í senn), fyrr enn hann hevur staðið prógv í byrjanarundirvísingini.

## 16.3. Hvør hevur skyldu at vera við í undirvísingini?

Útlendingur, ið er vorðin familjusameindur við ein persón, búsitandi í Føroyum, og sum hevur búsett seg í Føroyum við tí í hyggju at verða verandi her, eigur at hava skyldu til at verða við í undirvísingini. Við at vera við í byrjanarundirvísingini kann viðkomandi førleikamenna seg til at búgva og liva í Føroyum.

## 16.4. Undantak frá undirvísingarskyldu

Bólkurin heldur, at sum høvuðsreglu eiga allir útlendingar, búsitandi í Føroyum, at vera við í undirvísingini. Tó er altíð onkur, ið eigur at kunna verða undantikin. Men undirvísingin eigur at standa øllum útlendingum í boði, og prógv um, at royndin er staðin, eigur altíð at vera fortreyt fyri, at ikki-tíðarbundið loyvi verður givið, uttan so at heilt, heilt serlig viðurskifti tala ímóti, tí at ávísur málkunnleiki og grundleggjandi kunnleiki til samfelagið eru so altavgerandi fortreytir fyri at kunna standa seg í samfelagnum.

### 16.4.1. Arbeiðs- og uppihaldsloyvi

Spurningurin er, um tað er eitt rímiligt krav at seta, at ein útlendingur, ið kemur til Føroya við tíðarbundnum arbeiðsloyvi, skal fylgja byrjanarundirvísingini. Tíðarbundið arbeiðsloyvi merkir, at talan er grundregluliga um flytbara arbeiðsmegi, ið ikki skal seta búgv í landinum, men fara í annað land, tá ið tørvurin á arbeiðsmegi minkar ella verður nøktaður á annan hátt. Tí ber ikki til í tíðaravmarkaðum arbeiðsloyvi at krevja, at viðkomandi skal fylgja einum byrjanarskeiði.

Av royndum vísir tað seg tó, at útlendingar, ið koma til Føroyar við tíðarbundnum arbeiðsloyvi, ofta vilja verða verandi í Føroyum. Tá fer tað at vera ein óneyðug eyka forðing, um viðkomandi útlendingur ikki lýkur kravið um undirvísing, fyrr enn hann eftir 7 ár søkir um ikki-tíðarbundið loyvi.

Bólkurin metir tí, at útlendingar við tíðarbundnum arbeiðs- og uppihaldsloyvi ikki skulu verða kravdir at fylgja undirvísingini, men teimum skal standa í boði at fylgja byrjanarundirvísingini undir somu treytum sum hini, eru teir áhugaðir í tí.

Eisini mælir bólkurin til, at eitt serligt kunningarátak verður sett í verk, til tess at eggja útlendingum, ið longu hava fingið uppihaldsloyvi, ið ikki eru tíðarbundin, til at koma til undirvísingina.

### 16.4.2. Norðurlendingar

Í fleiri Norðurlondum sleppa ensktmæltir og norðurlendskir borgarar undan at taka av integrasjónstilboðnum, tí tey klára seg í samfelagnum uttan at fylgja undirvísingini. Av tí at enskt er annað mál í hesum londum, er stórur partur av tí tilfari, ið verður lagt til borgararnar, ikki bara á móðurmálinum, men eisini á enskum.

Síðani 1954, tá sáttmálin[5] um felags norðurlendskan arbeiðs-

5) http://www.norden.org/sv/om-samarbetet/avtal/avtal/arbetsmarknad

marknað varð gjørdur, hava norðurlendskir borgarar havt rætt til frítt at flyta millum Norðurlond at arbeiða. Tí skulu norðurlendingar ikki hava uppihaldsloyvi til at vera og virka í Føroyum, og verður tað tí ikki møguligt at seta tað sum krav, at hesir borgarar skulu vera við í byrjanarundirvísingini. Kortini halda vit, at undirvísingartilboðini eisini skulu kunna standa norðurlendingum í boði, so teir eisini kunnu fylgja byrjanar-undirvísingini, er áhugi fyri tí.

> Ongin skipað kunning er til útlendingar um, at tey hava rætt til undirvísing í føroyskum. Vantandi kunningin ger, at nógvir útlendingar í Føroyum ikki vita um hetta tilboðið, og tí hava teir ikki verið til undirvísing.

### 16.4.3. Enskt talandi

Bólkurin heldur, at viðvíkjandi enskmæltum borgarum, hevur tað stóran týdning, at teir eisini klára seg í samfelagnum og hava møguleika at seta seg inn í rættindi og skyldur í føroyska samfelagnum. Nógv av upplýsingartilfarinum í Føroyum er bara á donskum, um tað yvir høvur er á øðrum máli, tí okkara annað mál er danskt og ikki enskt, sum í øðrum Norðurlondum. Ein ensktmæltur persónur hevur tí ikki eins lætt við at fáa teir upplýsingar, ið eru í samfelagnum og um samfelagið, sum hann hevur í einum øðrum Norðurlandi. Tí heldur bólkurin, at eisini ensktmæltir persónar skulu verða kravdir at standa próvtøkuna í byrjanarundirvísingini, á sama hátt sum aðrir útlendingar.

### 16.4.4. Aðrir bólkar, ið ikki hava skyldu at vera við í undirvísingini

- lesandi,
- ferðafólk,
- au-pair.

Hugsað eigur at verða um, hvørt eldri fólk, ið eru komin so væl til árs, at tey ikki kunnu væntast at koma út á arbeiðs-marknaðin, eisini kunnu sleppa undan skylduni at taka prógv í byrjanarundirvísingini. Kanska skal frítøka tó bara kunna verða gjørd eftir ítøkiligari meting í einstaka førinum, tí sama um tú ert í vinnu, eru betri líkindi fyri, at tú trívist, kanst tú samskifta við fólk flest í samfelagnum. Eisini liggur munandi betur fyri at taka móti hjálparráðum, tá ið tú sjálvur ert førur fyri at samskifta við starvsfólk hjá Nærverkinum og Heilsuverkinum. Men í serligum førum kann tað vera útlitaleyst at royna við undirvísing. Neyðugt er tí, at løgtingslógin heimilar undantøk-um til partar av hesum persónsbólkum.

# 17. Undirvísingin skal enda við eini próvtøku

Próvtøkan kann verða skipað í tveimum. Ein fyri tey, sum til fulnar hava fylgt undirvísingini, t.e., at tey hava verið til staðar í minsta lagi 90% av undirvísingartímunum (eins og í miðnámsskúlunum), og ein fyri tey, sum ikki ella bara við hvørt hava fylgt undirvísingini.

Tá ið ein skipan er ætlað menniskjum, er altíð neyðugt at kunna gera undantøk. Hevur ein persónur fylgt undirvísingini í fleiri ár og verið til próvtøku og ikki staðið hana, eigur undantak at vera gjørt, um at viðkomandi kann fáa ikki-tíðarbundið loyvi uttan at hava staðið próvtøkuna. Hetta kann t.d. verða gjørt við, at undirvísarin verður hoyrdur um, hvørjar møguleikar viðkomandi hevur fyri at klára próvtøkuna. Heldur undirvísarin, at tað nærum er ómøguligt, at útlendingurin klárar próvtøkuna, eigur tað at bera til at gera eitt undantak til ásettu reglurnar um, at øll skulu klára próvtøkuna.

Klárar leiðreglur eiga at verða ásettar fyri, nær møguleiki verður at geva undantak, soleiðis at skipanin ikki verður gjørd so gyrðin, at hon til endans ongan virknað hevur.

## 17.1. Krøv til próvtøku

Krøvini til próvtøkuna skulu vera, at viðkomandi skal kunna prógva, at hann klárar at skilja føroyskt í talu og í skrift og hava kunnleika til gerandisføroysk samfelagsviðurskifti, samsvarandi tí førleikastøði, ið er endamálið við undirvísingini. Bólkurin mælir til, at ásett verður fast krav til próvtøkuna soleiðis, at øll koma upp til somu próvtøku. Próvtøkan skal hava serstakt heiti og hava sín egna samleika. Við hesum verður ongin ivi um, hvat próvtøkan er.

Uppskot okkara er, at próvtøkan skal kallast Almenna føroyska integrasjónsroyndin fyri útlendingar, stytt AFIÚ. Tá ið heitið verður sett á royndina verður onki ivamál um, hvørja próvtøku viðkomandi hevur staðið. Útlendingurin kann t.d. brúka hetta heitið, tá ið hann skal søkja um upptøku á øðrum skúlum bæði í Føroyum og uttanlands.

## 17.2. Hvør hevur ábyrgd av, at útlendingar fáa undirvísing?

**Landið ella kommunurnar?**

Bólkurin heldur, at Mentamálaráðið skal skipa fyri undirvísingini, men at byrjanarskeiðini til vaksin vera undir kvøldskúlanum ella í samstarvi við hann. Grundgevingarnar eru, at tá ið landið tekur sær av at skipa undirvísingina, ber til at samla undirvísingina landafrøðiliga í so fáar eindir sum til ber; kvøldskúlaskipanin hevur royndir í smidliga at skipa fyri skeiðum til vaksin.

Bólkurin mælir til, at lærararnir verða serliga útbúnir til at undirvísa útlendingum. Til undirvísingina í føroyskum er neyðugt at fáa fatur á lærarum, ið hava útbúgving í at undirvísa í føroyskum sum fremmandamáli.

Verða skeiðini skipað í ella í samstarvi við kvøldskúlaskipanina, er mestsum sjálvsagt, at kommunurnar skipa fyri hølunum eins og til kvøldskúlaundirvísingina annars.

## 17.3. Hvar skal undirvísingin verða skipað?

Útlendingarnir, sum nú eru í landinum, hava ríkisborgararætt í 85 londum. Hagtøl eru ikki um, hvørji móðurmál tey hava, men móðurmálini munnu vera á leið eins nógv. Samstundis eru útlendingarnir bara 883 í tali samantalt, fleiri teirra hava longu búð her í nógv ár. Næmingagrundarlagið til byrjanarundirvísingina fer tí at vera avmarkað.

Bólkurin heldur tí, at undirvísing verður betri, og kostnaðurin verður væl minni, um undirvísingarstøðini verða heilt fá. Undirvísingin verður dygdarbetri, og eisini fer at bera til at hava undirvísing á fleiri førleikastigum.

Hildið verður, at verður partur av undirvísingini skipaður sum vikuskiftisskeið, verður tað fyrimunur bæði sosialt og at sloppið verður undan at fara av arbeiðsplássinum til undirvísing.

## 17.4. Hvussu skal skyldan at vera við í undirvísingini verða ásett?

Skyldan at fylgja byrjanarundirvísingini kann annaðhvørt verða ásett við einum kravi um, hvat næmingurin skal kunna ella við at seta eina tíðaravmarking á, nær undirvísingin skal verða liðug.

Við ávísum kravi um, hvat tann einstaki skal duga, tá ið undirvísingin er liðug, má verða hugsað um, at tað kann vera sera

ymiskt, hvussu skjótt fólk læra mál, tí førleikarnir, ið tey hava, áðrenn tey byrja at ganga til hesa undirvísing, eru sera ymiskir.

Verður støðið sett ov høgt, verður trupult hjá útlendingunum at læra, og verður støðið ov lágt, er vandi fyri, at útlendingarnir læra ov lítið og tí ikki fáa neyðuga førningin til tess at fáa veruligt gagn av undirvísingini í gerandisdegnum.

Neyðugt er at áseta undirvísingarskylduna við einum ávísum tíðarkarmi. Á tann hátt verður lættari at siga, hvussu nógv skipanin fer at kosta.

### 17.5. Avleiðingar av, at ein útlendingur ikki fylgir undirvísingini ella ikki fer upp til próvtøku.

Verður skipanin bygd soleiðis upp, at tað verður krav ella skylda, at ein útlendingur klárar próvtøkuna, verður neyðugt at hugsa um, hvørjar "avleiðingar" tað skal hava fyri tey, ið ikki lúka treytirnar. Vanliga hava sanktiónir millum land og borgarar ta fylgju, at ein "revsing" verður givin, ella missir borgarin rættindi til onkran ágóða.

Tá ið talan er um at sanktionera útlendingar, lúka teir ikki ásettu treytunum, hevði tað verið einfalt, at tað fekk ávirkan á framhaldandi uppihaldið hjá útlendinginum í Føroyum.

Teir útlendingar, ið fáa almennan stuðul, kunnu missa ein part av hesum stuðli. Tá ið útlendingarnir ikki eru nógvir, ið hava rætt til almennan stuðul, áðrenn teir hava fingið ikki-tíðarbundið loyvi, man henda sanktiónin ikki fara at ávirka stórvegis.

„Verður støðið sett ov høgt, verður trupult hjá útlendingunum at læra, og verður støðið ov lágt, er vandi fyri, at útlendingarnir læra ov lítið og tí ikki fáa neyðuga førningin til tess at fáa veruligt gagn av undirvísingini í gerandisdegnum.

# 18. Treytir í sambandi við ikki-tíðarbundið loyvi

Í útlendingalógini ber til at áseta, at útlendingur bara fær ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi eftir ávíkavist 3 og 7 árum, sum eru vanligu treytirnar, um hann tekur prógv í byrjanarskeiðnum. Eisini kann verða ásett við hóskandi freist – til dømis 2 ár eftir at lógin er broytt, at eitt uppihaldsloyvi ikki kann endurnýggjast, um viðkomandi hvørki hevur staðið royndina ella fylgt kravdu undirvísingini.

Tá ið talan er um familjusameining er loyvið hjá útlendinginum tengt at tí persóninum viðkomandi er familjusameindur við. Um tann persónurin ikki vil, at útlendingurin skal integrerast, kann hann halda útlendinginum burtur frá undirvísingini. Verður ein treyt sett í útlendingalógina, at ein útlendingur skal fylgja undirvísing, áðrenn hann kann fáa ikki-tíðarbundið loyvi, kann tað, at viðkomandi ikki sleppur at ganga til undirvísing, hava ta fylgju, at útlendingurin ikki fær ikki-tíðarbundið loyvi og tí má endurnýggja uppihaldsloyvið eitt ár í senn.

## 18.1. Treytir fyri at gerast ríkisborgari

Til ber at søkja um ikki-tíðarbundið loyvi eftir ávíkavist 3 árum hjá familjusameindum og eftir uml. 7 árum hjá útlendingum við arbeiðs- og uppihaldsloyvi. Til ber at søkja um at skifta ríkisborgararætt eftir 9 [6] árum. Við at skifta ríkisborgararætt verður tilknýtið til føroyska samfelagið meira varandi, og útlendingurin verður fevndur av øllum teimum rættindinum, ið samfelagið hevur. Tað ger, at strangari krøv kunnu verða sett málkunnleikanum og samfelagskunnleikanum hjá útlendinginum, enn tá ið útlendingurin søkir um eitt arbeiðs- og uppihaldsloyvi ella um familjusameining. At strong krøv verða sett útlendingi, ið hevur búð í Føroyum í 7 ár, virkar ikki órímiligt.

---

6)Sbrt. §§ 7 og 8 í LBK nr 422 af 07/06/2004- Bekendtgørelse af lov om dansk indfødsret

# 19. Bólkar, ið serligar skipanir kunnu verða gjørdar til

Sum er, er so lítið gjørt við útlendingaøkið, at ikki ber til at siga, hvørt tørvur er á serskipanum til ávísar útlendingabólkar. Hugsandi er, at neyðugt verður at gera serligar skipanir til ymsar bólkar. T.d. kundi talan verið um

- Børn við útlendskum foreldrum
- Útlendingar, giftir føroyingum
- Ungir útlendingar
- Eldri útlendingar

Sum støðan er í løtuni fevna hesir bólkar um nærum allar teir útlendingar, ið hava skyldu at vera við í frálæruni á byrjanarskeiðnum. Tí verður ikki hildið neyðugt, at serligar skipanir verða gjørdar til bólkar.

Havast skal tó í huga at ymsa staðni í landinum búgva lutfalsliga fá fólk, soleiðis at sjálvt fáir útlendingar eru ein stórur partur av íbúgvatalinum. Tí mælir bólkurin til, at integrasjónslógin heimilar at serstøk integrasjónsfremjandi tiltøk kunnu verða sett í verk í ávísum økjum.

# 20. Skal skipanin verða sjálvboðin ella kravd?

Bólkurin mælir til, at skipanin skal vera kravd hjá teimum, ið hava fingið uppihaldsloyvi við atliti at ikki-tíðarbundnum uppihaldsloyvi.

Eisini verður mælt til, at skipanin skal vera kravd hjá teimum, ið hava havt arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum í fleiri ár, sum søkja um uppihaldsloyvi, við atliti at ikki-tíðarbundnum uppihaldi í Føroyum.

Skipanin skal vera sjálvboðin hjá teimum, ið hava arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum og á tann hátt hava fingið eitt uppihaldsloyvi, við atliti at tíðarbundnum uppihaldi í Føroyum.

Bólkurin heldur, at hesi seinast nevndu eisini skulu hava rætt til at vera við í undirvísingini á sama hátt og undir somu treytum sum tey, sum hava skyldu at taka lut í skeiðnum. Orsøkin er, at nógvir av hesum útlendingum ætla sær at verða verandi í Føroyum. Tá ið tað verður sett sum krav, at teir duga føroyskt, tá ið teir søkja um ikki-tíðarbundið loyvi, heldur bólkurin, at tað er stórur fyrimunur fyri útlendingin, um hann hevur fylgt undirvísingini frá byrjanini. Bólkurin heldur eisini, at teir útlendingar, ið búgva í Føroyum, tá ið henda skipanin verður sett í verk, skulu fáa møguleika at fylgja undirvísingini, hóast undirvísingin ikki verður kravd skipan fyri hesar útlendingar.

Teir útlendingar, ið búgva í Føroyum, tá ið henda skipanin verður sett í verk, skulu fáa møguleika at fylgja undirvísingini, hóast undirvísingin ikki verður kravd skipan fyri hesar útlendingar.

# 21. Hvussu verður undirvísingin fíggjað?

## 21.1. Um kostnaðin av integrasjóns-fremjandi undirvísing í føroyskum máli og føroyskum samfelagsviðurskiftum

Ilt er at meta um, hvat tað fer at kosta at gera fasta skipan um byrjanarskeið til vaksin og skipa eyka undirvísing í føroyskum til børn í fólkaskúlaaldri, tí at vit vita so lítið um tørvin, og vit vita eisini lítið um hvørjar førleikar, vit longu hava í landinum til at veita og menna undirvísingina.

## 21.2. Byrjanarskeið til vaksin

Undirvísingin á kravda byrjanarskeiðinum, ið bólkurin mælir til (umleið 100 klokkutímar í føroyskum, og umleið 50 klokkutímar um samfelagsviðurskifti), kostar samantalt umleið 1,8 milliónir krónur um árið, verður undirvíst á 5 støðum. Omaná legst kostnaður til høli og undirvísingartilfar.

Útreiðslan til byrjanarskeið verður væntandi rættiliga støðug, tí undirvisingin verður í flokkum, og verður helst sjáldan ávirkað serliga nógv av, hvussu nógvir næmingar eru í hvørjum øki. Verða skeiðsstøðini bara eini 4 ella 5, sum mælt verður til, er hugsandi, at grundarlag verður at hava undirvísing á øllum skeiðsstøðum hvørt ár; men hugsandi er, at tørvur ikki verður á undirvísing á fleiri torleikastigum á øllum støðunum hvørt ár.

## 21.3. Eyka undirvísing í føroyskum í fólkaskúlanum

Fyrst og fremst verður hvør næmingur undirvístur sær. Útreiðslan kann tí hugsast at sveiggja nakað, tí at næmingarnir, ið hava føroyskt sum annað mál eru lutfalsliga fáir (um 90, at døma eftir tølunum frá Hagstovuni um børn, sum hava foreldur við ríkisborgararætti í øðrum londum). Tímatørvurin fer tí at sveiggja alt eftir, hvussu nógvum børnum tørvar nógva undirvísing.

Verður roknað við 90 næmingum, at hvør næmingur verður undirvístur sær, og at miðal tørvurin er 3 tímar um vikuna, verður kostnaðurin umleið 4.4 milliónir kr. fyri eitt skúlaár. Men av tí at so lítið verður gjørt við økið sum er, er ógvuliga ilt at spáa um, hvør veruligi tørvurin er. Helst tekur tað stívliga eitt ár at staðfesta, hvør ið veruligi tørvurin er.

Tørvurin kann hugsast at vera væl størri í fyrstani, men síðani at minka nakað, sum frá líður, alt eftir, hvussu tiltøkini á dagstovnum og fyrstu skúlaárini eydnast.

## 21.4. Lærarar, ráðgevar, skeiðslærarar og undirvísingartilfar – eyka byrjanarkostnaður

Av tí at so lítið verður gjørt við økið sum er, vita vit serstakliga lítið um, hvørt skikkað fakfólk við rætta serkunnleikanum eru tøk til undirvísingina, ella neyðugt verður at læra fólk upp.

Fólkaskúlalærarum tørvar ikki eyka námsfrøðiligar førleikar til tess at verða skikkaðir at undirvísa næmingunum í fólkaskúlanum; men neyðugt er, at eitt toymi verður skipað, ið kann leggja teimum lag á at leggja undirvísingina til rættis. Hetta toymið skal hava serstakar førleikar og byggja upp eina felags fakliga tilgongd. Í tí sambandi verða ávísar útreiðslur, sum ilt er at spáa um, tó at tær ikki vera so ovurhonds stórar.

Hvussu støðan er við undirvísarum, ið hava førleikar at undirvísa tilkomnum fólki í føroyskum sum fremmandamáli, hevur ikki eydnast at fáa uppspurt, men væntandi er neyðugt at rokna við, at tað fer at kosta at byggja upp eitt toymi av skikkaðum undirvísarum.

Neyðugt er sum skjótast at gera undirvísingartilfar til byrjanarskeiðini. Tað er ein fyrimunur, um alt tilfarið er talgilt soleiðis, at lætt er at gera venjingar við hús, og at ómakaleyst verður at dagføra tilfarið. Ilt er at seta kostnað á. Til tess at koma í gongd sum skjótast, verður helst neyðugt at framleiða tilfar skjótt í fyrsta umfari. Kostnaðurin verður tí ikki so stórur í fyrsta umfari, men afturfyri verður neyðugt at rokna við fitt av útreiðslum til at menna tilfarið øll tey fyrstu árini.

Neyðugt verður eisini í ávísan mun at framleiða sergjørt undirvísingartilfar til eyka undirvísingina í føroyskum í fólkaskúlanum. Hetta fer helst at taka nøkur ár, so hvørt sum tey, sum undirvísa, gera sær royndir.

Ilt er yvirhøvur at meta um kostnaðin av at framleiða undirvísingartilfar, tí forkunnleikin um økið er somikið lítil. Onki er tó at taka seg aftur í, at nógv er at vinna við at læra av frægastu royndunum, ið tey í øðrum londum hava gjørt sær á hesum øki.

Av tí at so sera nógv viðurskifti eru ókend, og ilt er at spáa um, hvussu skjótt ferð kann verða sett á ymsu økini, verður mælt til eina trý ára royndarverkætlan.

# 22. Kann skipanin hvíla í sær sjálvari?

Hildið verður ikki, at skipanin fíggjarliga kann hvíla í sær sjálvari. Orsøkin til tað er, at tað er ein heilt nýggj skipan, ið skal byggjast upp frá grundini og tey gjøld, til dømis skeiðsgjøld, ið kundu verið løgd á einstaka útlendingin, høvdu munað lítið í mun til útreiðslurnar.

Harafturat verður hildið, at verður eitt dýrt gjald lagt á fyri at vera við í t.d. undirvísingini, tí skipanin skal hvíla í sær sjálvum, kann tað skjótt forða nógvum útlendingum at vera við.

Ein munagóð inntøka kundi kanska verið fingin til vega, um gjald varð lagt á arbeiðsgevaran í sambandi við arbeiðsloyvi. Hetta er tó ikki ein spurningur, ið er stórvegis viðgjørdur í bólkinum, tí føroyskir myndugleikar kunnu ikki leggja slíkt gjald á, fyrr enn útlendingaøkið er yvirtikið. Umframt málsræðisligu forðingina verður mett ráðiligast, at spurningurin um gjald fyri arbeiðsloyvi verður viðgjørdur í størri arbeiðsmarknaðarpolitiskum og ítróttarpolitiskum høpi, áðrenn støða verður tikin til, um gjald skal verða lagt á.

Tulkatænastan kann kanska hvíla í sær sjálvari, verður fast gjald sett á fyri at brúka hana. Við í kostnaðarspurningin av tulkatænastuni má eisini umhugsast, at skipanin má ikki vera alt ov dýr, soleiðis at teir brúkarar, ið skipanin er ætlað til, ikki hava ráð at brúka hana. Hava brúkararnir ikki ráð at brúka tulkatænastuna, ger hon ongan mun.

# Skjal 1. Integrasjónspolitikkur í Norðurlondum

## Ísland

Á leið 25.000 útlendingar eru í Íslandi í løtuni. Talið er høgt prosentvís (7,4% í 2009), men hóast tað er ongin serstøk integrasjónslóg, ið beinleiðis sigur, hvat skal verða gjørt fyri at tryggja, at innflytarar integrera seg skjótt og smidliga inn í íslendska samfelagið. Í januar 2007 samtykti Alþingið eina almenna 'strategi' fyri tilflytaraintegrasjón. Tilflytingin av útlendingum til Íslands verður í henni umrødd sum ein jalig gongd, tí hetta er við til, at íslendska samfelagið verður fjølbroyttari. Innflytarar hava rætt til at nýta síni evni, førleikar og íverksetarafýsni. Strategiin leggur dent á, at kunnleiki til íslendska málið er tann týdningarmiklasti liðurin í eini jaligari integrasjónsgongd, tí tað ger tilflytararnar førar fyri at tosa við onnur, fata og verða virknar í samfelagnum.

Hóast Ísland ikki hevur eina integrasjónslóg, eru fleiri lógir[7], ið eru týdningarmiklar, tá ið ræður um integrasjónsmál. Í løtuni situr ein arbeiðsbólkur og skrivar álit um integrasjón. Upprunaliga var ætlanin hjá bólkinum at skriva eitt álit, sum leggur upp til, at ein serstøk integrasjónslóg verður smíðað, men tað er broytt. Ætlanin er nú at koma við einum tilmæli um, betur at samskipa tær tænastur og veitingar til innflytarar, ið longu eru tøkar. Tískil fer álitið væntandi at leggja upp til, at broytingar verða gjørdar í t.d. lógini um tulkatænastu og lógini um flóttafólk við tí fyri eyga at samskipa tænasturnar betur.

Í 2009 vóru ISK 256,1 milliónir av fíggjarlógini settar av til tilflytaraintegrasjón. Hetta er við dagsins gangvirði DKK 12,4 milliónir. Væntandi verður henda játtanin minni næsta ár, tí nógvar sparingar skulu gerast á so at siga øllum økjum.

7) Alþingslóg nr. 96/2002 um innflytarar (http://eng.domsmalaraduneyti.is/laws-and-regulations/nr/105). Alþingslóg nr. 97/2002 um arbeiðsrættindi hjá innflytarum (http://www.vinnumalastofnun.is/forsida/mappa-log-og-reglugerdir/foreign-nationals-right-to-work-act/ ). Alþingslóg nr. 53/2003 on the regulation of foreigners (http://eng.domsmalaraduneyti.is/laws-and-regulations/nr/860). Alþingslóg nr. 339/2005 on foreign nationals' right to work (http://eng.felagsmalaraduneyti.is/media/acrobat-enskar_sidur/Regulations_on_foreign_nationals_rights_to_work_No_339_2005.pdf)

### Tilflytarar og mannarættindi

Í Íslandi verður kjakast um, hvussu mannarættindini hjá innflytarum best verða vard. Ein møguleiki, ið verður havdur á lofti, er at gera ein Mannarættindarstovn. Uppgávan hjá stovninum skuldi verið at verja øll mannarættindi, bæði hjá teimum, ið bera brek, kynsligum minnilutum, útlendingum o.s.fr. Við at leggja integrasjónsmál undir ein slíkan stovn verður fokus flutt frá, at tey eru „fremmandafólk", og ljós verður varpað á, at tey eru menniskju við somu rættindum sum øll onnur, og verða viðfarin á jøvnum føti við onnur, ið hava tørv á at venda sær til Mannarættindarstovnin. Farið verður frá at peika eftir útlendingum til at spyrja, hvat teimum tørvar fyri at verða integrerað í íslendska samfelagið.

Um Ísland verður partur av Europa Samveldinum er eitt krav, at ein slíkur stovnur fæst at rigga, men enn er ongan veg komið við ætlanini, og onki ítøkiligt er gjørt politiskt fyri at gera stovnin til veruleika.

### Útlendsk arbeiðsmegi

Tann útlendska arbeiðsmegin í Europa hevur eitt lønarlag, ið liggur lægri enn miðallønin hjá tí vanliga europearanum, og soleiðis er støðan eisini í Íslandi. Nú hava flestu lond í Europa sett avmarkingar og kvotur á, hvussu nógvum tilflytarum tey taka ímóti hvørt ár, og gongdin hevur verið, at tey, ið ikki hava útbúgvingar, verða útihýst, men hini, ið hava útbúgvingar á hægri stigi, eru nógv eftirspurd.

Síðani fyrst í 80unum hevur Ísland havt ógvusligar fíggjarligar uppgangstíðir. Serliga hevur ferð verið á byggivinnuni, og ein av avleiðingunum er, at tilflytarar í stórum tali eru komnir til Íslands innan fyri stutta tíð. Fyrst í 90árunum vóru 5.500 tilflytarar, ið høvdu fingið uppihaldsloyvi. Í 1994 taldu útlendingar 1,7 % av fólkatalinum í Íslandi. Í 2006 var parturin 6 %, og í 2008 var hann 8.1 % ella 25.265 fólk. Fyrsta ársfjórðing í 2009 fóru 761 fleiri fólk úr Íslandi, enn tað komu inn til Íslands. Tí er vakstrargongdin nú steðgað, men líkt er til, at vøksturin fer at taka seg upp aftur, tá ið kreppan er avhæsað. Tilflytarar hava virkað til, at Ísland er farið frá at vera eitt sera homogent samfelag, har øll tosaðu sama mál, høvdu sama mentanarliga arv, somu trúgv og sama húðarlit, til at vera eitt fjølbroytt (pluralistiskt) samfelag, har nógv tungumál verða tosað, nógvir ymiskir siðir, mentanir og trúðarstevnur eru umboðað, og har øll ikki líkjast.

Ísland tekur ímóti nøkrum flóttafólkum hvørt ár, ímillum 20 og 30. Hvørt ár er eitt tema fyri hvussu flóttafólk, ið fáa asylum í Íslandi, verða vald út. Í 2010 var temaið 'women at risk'.

### Integrasjón

Tey, ið fáa loyvi at búseta seg í Íslandi, verða kunnað um teirra persónligu rættindi sum innflytarar, men eisini verður dentur lagdur á tær samfelagsligu skyldur og ábyrgd, ið fylgja við í einum vælferðarsamfelag. Flestu heimasíður, ið hava eitthvørt við viðurskifti hjá innflytarum at gera, eru tøkar á fleiri málum. Heimasíðurnar hava so at siga alla ta kunning, ið innflytarar hava tørv á. Tað er umráðandi, at kunningin er tøk á øðrum tungumálum enn bara enskum, tí nógvir innflytarar skilja illa enskt, og aðrir skilja als ikki enskt. Heimasíður verða ofta týddar til enskt, teilendskt og pólskt.

## Stovnar, ið hava til endamáls at hjálpa útlendingum

### Alþjóða Hús

Alþjóða Hús liggur í hjartanum í Reykjavík. Húsið er opið allar vanligar dagar allan dagin. Húsið er ætlað øllum útlendingum, ið eru í Íslandi, tað veri seg styttri ella longri tíðarskeið. Starvsfólkini í húsinum veita hjálp til ymisk persónlig viðurskifti, t.d. at fáa persónsnummar og upplýsningar um skúlaverkið, bústaðarviðurskifti, heilsuverkið, tryggingarviðurskifti o.s.fr. Ein prestur, ið er tilnevndur av statskirkjuni, er tengdur at húsinum, og hansara uppgáva er at veita persónliga vegleiðing, og í summum førum sálarhjálp, til viðskiftafólkini. Viðskiftafólkini bíleggja tíð hjá honum á heimasíðuni hjá Altjóða Húsinum. Tilboðið er ókeypis.

### Fjølmenningasetur

Í 2000 varð samtykt í Alþinginum, at eitt setur fyri innflytarar skuldi verða sett á stovn. Hetta varð uppgávan hjá Félags- og tryggingarmálaráðuneytinum, og setrið varð veruleiki í 2001. Fyrstu tíðina var bert eitt starvsfólk á setrinum, men virksemið er sera nógv vaksið, og nú eru 6 starvsfólk á setrinum.

Setrið liggur í Ísafirði á Vestfirðum nakrar tímar frá Reykjavík, men virkar fyri alt landið. Uppgávan hjá setrinum er fyrst og fremst at kunna innflytarar um teirra rættindi í Íslandi, og eisini at skapa sambond millum innflytarar. Tá ið lógir verða skrivaðar og mannagongdir gjørdar, ið onkursvegna ávirka innflytarar, hevur stovnurin ein umráðandi leiklut sum ráðgevi. Kommunur hava eisini møguleika at venda sær til Fjølmenningasetur at fáa ráðgeving, tá hópar av útlendingum koma til kommunurnar.

### Íslendskt málskeið

Íslendskur málkunnleiki verður roknaður sum eitt tað týdningarmiklasta stigið til fulla integrasjón. Íslendskur málkunnleiki er fyritreyt fyri, at ein útlendingur kann luttaka í samfelagnum og kann koma at skilja íslendsku mentanina. Og tí eru nógvir stovnar, ið bjóða íslendsk málskeið (t.d. Atþjóða Hús, Háskóli Íslands, ymiskir kvøldskúlar o.s.fr.). Søkt skal verða um loyvi frá Mentamálaráðnum at bjóða málskeið út. Mennta- og menningarmálaráðuneyti framleiðir tilfar til undirvísingina, og høvuðsendamálið við henni, er at:

- Tey luttakandi klára seg í gerandisstøðum
- Tey luttakandi klára seg í óvæntaðum støðum
- Tey luttakandi fáa málkunnleika til at hava stuttar samtalur um almenn evni
- Tey luttakandi fáa førleika til at skilja samtalur millum onnur fólk
- Tey luttakandi fáa førleika til at lesa stuttar tekstir um kend evni, og verða før fyri at skilja innihaldið
- Tey luttakandi megna at skriva stuttar tekstir um kend evni
- Tey luttakandi fáa kunning og fatan av íslendskari mentan og siðum, og fáa grundleggjandi samfelagsliga vitan
- Tey luttakandi verða før fyri at skilja yvirskriftir í sjónvarpi og útvarpi

Undirvísingarætlanin tilskilar, at útlendingar skulu ígjøgnum 240 tímar av íslendskari undirvísing (ein tími er at rokna sum 40 minuttir), og hesir tímarnir verða býttir í 4 modul, sum eru 60 tímar hvørt. Vanliga verða modulini kallað íslendskt 1, 2, 3 og 4 (1 er tað lættasta og 4 tað truplasta). Strategiin tilskilar ikki, at modulini skulu verða tikin yvir eitt ávíst tíðarskeið. Ongin endalig roynd er fyri tey 4 modulini, men er tað í staðin upp til læraran at meta um førleikan hjá tí einstaka, og geva prógv, um førleikin er nøktandi (men í praksis verður prógv so at siga ongantíð noktað).

Eisini er møguligt at taka málskeið ókeypis á alnótini[8].

8) http://www.mcc.is/english/extra/learning-icelandic/internet .

Mennta- og menningarmálaráðuneyti stuðlar undirvísingarstovnum við ISK 5000 fyri hvønn undirvísingartíma. Eisini letur Mennta- og menningarmálaráðuneyti ISK 300 fyri hvønn luttakaratíma, t.e. næmingatal faldað við tímatali. Hesin stuðul verður tó bert latin fyri næmingar, ið møta til meir enn 75% av undirvísingartímunum. Á vári 2010 var prísurin fyri eitt 60 tíma skeið ímillum ISK 20,000 og 30,000.

Undirtøkan fyri málskeiðnum er vaksin sera nógv seinastu árini. Niðanfyri síggjast hagtøl fyri luttakaratalið árini 2005-2008.

fyri undirvísing fyri sínum útlendsku arbeiðsfólkum. Tá ið luttakarnir høvdu gjøgnumført málskeiðið, varð kannað, hvussu støðan og trivnaðurin á arbeiðsplássinum var. Kanningin vísti, at tey, ið luttóku høvdu

- Minni sjúkufráveru
- Vóru oftari og meiri við í arbeiðstiltøkum
- Megnaðu at gera seg skillig á íslendskum

Eisini vóru bæði útlendingar og íslendingar samdir um, at arbeiðshýrurin var betri. Jaligu úrslitini komu óivað av, at undirvísingartilfarið varð lagt til rættis eftir tørvinum hjá útlendingum, og tí var lættari hjá luttakarunum at koma í samband við íslendingar, og tað skundaði undir integrasjónsgongdina.

| Íslendskt 2: | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|
| Luttakaratal | 990 | 2582 | 2774 | 6152 |
| Undirvísingartímatal | 42.719 | 126.540 | 128.108 | 172.694 |

Fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Íslandi er neyðugt, at umsøkjarin hevur gjøgnumgingið 150 tímar í íslendskari málundirvísing og hevur nøktandi íslendskan málkunnleika.

Í 2009 vóru ISK 128 milliónir settar av til íslendsk málskeið (hetta er við dagsins virði DKK 6,2 milliónir).

## Úrslit av málskeiðum

Fleiri kanningar hava verið gjørdar at kanna, hvørja ávirkan luttøka í málskeiðum hevur á integrasjónsgongdina hjá útlendingum. Seinasta slíka granskingarverkætlanin varð fíggjað av norðurlendska ráðharraráðnum. Tað var Nationalt Center for Kompetenceudvikling í samarbeiði við Háskóla Íslands, Norges Teknisk-Naturvidenskabelige Universitet, Gøteborgs Universitet, Åbo Akademi University, ið gjørdi kanningina. Kanningin varð almannakunngjørd í januar 2010, og hetta er samstundis fyrsta norðurlendska komparativa kanningin av endur-útbúgvingum sum lið í integrasjónsgongdini.

Í 2003 vóru 80% av starvsfólkunum hjá Pf/ Grandi útlendingar. Tey vóru 100 ófaklærd fólk. Tey ymsu starvsfólkini vóru kallað inn til samtalur, har tey søgdu frá sínum upplivilsum og eisini greiddu tey frá, hvat tey vilja fáa burtur úr undirvísing í íslendskum máli. Undirvísingartilfar varð gjørt og lagt til rættis eftir tørvinum hjá starvsfólkunum. Grandi skipaði síðani

## Tulkatænastan

Fólk, ið koma til Íslands og ikki skilja málið til fulnar, hava rætt til at fáa tolk við sær til ymiskar álvarsamar samtalur, sum t.d. tá ið tey eru í sambandi við heilsuverkið, og tá tey skulu á foreldrafund í skúlunum, har børn teirra ganga. Hetta fíggjar staturin, og tænastan er ókeypis hjá innflytarum.

## Løgfrøðilig ráðgeving

Innflytarar hava rætt til at fáa ókeypis løgfrøðiliga ráðgeving í málum, ið kunnu vera trupul og ørkymlandi at fáa greiðu á. Henda tænastan verður samskipað av Alþjóða Hús. Ein og hvør kann venda sær til Alþjóða Húsið og bíleggja sær tíð at koma á fund við løgfrøðing, ið so setur seg inn í málið, metir um støðuna og gevur góð ráð. Løgfrøðingurin gevur óhefta ráðgeving uttan at fara inn í ítøkiliga málið. Til slíkar viðtalur hevur innflytarin rætt at fáa tolk við sær.

## Leiklutur skúlaverksins

Av tí at tilflytingin av útlendingum ikki veruliga tók dik á seg fyrr enn í 80árunum, eru ikki nógvir annað-ættarliðstilflytarar í Íslandi. Harafturímóti eru sera nógv børn, ið eru fødd uttan fyri Ísland, ið nú ganga í barnaskúla og framhaldsskúla í

Íslandi, og tí hava annað móðurmál enn íslendskt. Almenni undirvísingarpolitikkurin er, at hesi børnini og ungdómarnir skulu fáa eina so góða útbúgving sum møguligt. Og tí er neyðugt, at skúlaverkið virðismetir teirra mentan, mál og uppruna. Eisini skal góðtakast, at teirra mentanarliga menska, og teirra almenna vitan víkir frá tí hjá íslendskum børnum. Lærarar skulu virka fyri at byggja brýr ímillum mentanarliga munin á íslendskum og útlendskum børnum. Børnini verða undirvíst í mannarættindum og sosiologi og eisini verður roynt at styrkja virðingina fyri øðrum mentanum enn bara teirri íslendsku. Børn og ungdómar við fremmandum uppruna hava eisini rætt til undirvísing í íslendskum sum fremmandum máli og ikki sum móðurmáli.

### Valrættur

Tá ið persónur av útlendskum uppruna hevur búð í Íslandi í 5 ár, fær hann valrætt til kommunuval, og somuleiðis hevur hann rætt at stilla upp. Hetta gevur innflytarum møguleikan at verða virknari í samfelagnum og eisini at hava ávirkan – annaðhvørt við at velja ein uppstillaðan, ið umboðar teirra sjónarmið, ella at stilla upp sjálvur.

## Danmark

Tann danska integrasjónslógin[9] varð sett í gildi 1. juli 1998, og lógin er broytt fleiri ferðir. Integrasjónslógin hevur til endamáls at tryggja at nýggj flóttafólk og aðrir útlendingar, ið hava fingið uppihaldsloyvi í Danmark, verða slúsaðir inn í danska samfelagið. Harafturat ásetir lógir, at útlendingarnir skulu gerast sjálvforsyrgjandi, og at teir við integrasjónstilboðnum skulu fáa eina fatan av danska samfelagnum, m.a. tá ið um grundleggjandi virði og normar ræður.

Áðrenn integrasjónslógin varð sett í gildi, metti danska stjórnin, at flóttafólk og aðrir innflytarar høvdu ov fáar møguleikar, og ov fá krøv vóru sett útlendingunum við førda politikkinum. Við integrasjónslógini skuldi politikkurin verða skipaður og førdur virknari soleiðis, at bæði útlendingurin og danska samfelagið fingu nakað burturúr. Integrasjónslógin regulerar tey tilboð, ið verða boðin nýggjum flóttafólki og øðrum innflytarum.

9) LBK nr 1062 af 20/08/2010

Tilboð um málundirvísing miðar fyrst og fremst móti nýggjum flóttafólki og øðrum innflytarum. Í 2004 var talan um 6 modulir, ið svaraðu til uml. 2.024 tímar. Luttøkan í málundirvísingini er partur av innleiðsluskránni og tí er luttøkan kravd. (2.024 tímar svarar til 1½ ársverk á 37 tímar við arbeiðsári, sum er 46 vikur).

Nýggj flóttafólk og familjusameind fólk, ið koma úr ikki-Norðurlondum og ES/EBS londum, fáa tilboð um eitt tríára innleiðslutilboð. Innleiðslutilboðið fatar um útbúgving í donskum við samfelagslæru og aktiv tilboð, sum annaðhvørt kunnu verða vegleiðing og uppstigan, starvsvenjing á virkjum ella arbeiði við lønarískoyti. Onnur, t.e. ikki nýkomin flóttafólk ella familjusameindir útlendingar, ið eru sjálvstøðug ella sum onnur taka sær av (talan er oftast um fólk, ið verða familjusameind við onnur flóttafólk) fáa nú eisini tilboð um at vera við í innleiðsluni, við t.d. starvsvenjing á virkjum ella við arbeiði undir eini stuðulsskipan í upp til 9 mðr., sum staturin stuðlar. Kommunurnar hava skyldu at geva útlendingunum slík innleiðslutilboð.

Í Danmark eru tað fyrst og fremst kommunurnar, ið hava ábyrgd av at integrera útlendingar í arbeiðsmarknaðin. Kommunurnar arbeiða saman við Arbeiðsloysisskipanunum og øðrum aktørum, ið fáa fólk í arbeiði.

Stuðul frá statinum er fyri ein part treytaður av, hvussu væl integrasjónin hepnast.

Í Danmark er ásett við lóg, at útlendingar, ið ikki eru við í innleiðslutilboðnum, kunnu verða revsaðir. Tað merkir, at útlendingar, ið ikki eru við í málundirvísing, samfelagslæru ella í arbeiðsmarknaðartilboðunum kunnu missa "kontanthjálpina". Tað rakar sjálvandi bara tey, ið fáa "kontanthjálp"

Danmark setir stór krøv til borgarar, ið vilja hava ríkisborgararættindi. Allir útlendingar uttan norðurlendingar skulu hava staðið eina roynd í donskum fyri at kunna gerast ríkisborgarar.

Í 2002 varð integrasjónsskráin kravd. Í 2004 varð aftur at integrasjónslógini ásett ein lóg um undirvísing í donskum, sum miðsavnaði og styrkti útbúgvingina í málundirvísing og økti um fyriskipanir sum starvsvenjing og annað arbeiðsmarknaðarfremjandi.

Til ber ikki at hava dupultan ríkisborgararætt í Danmark.

Danmark hevur tikið undir við m.a. hesum altjóðasáttmálum, ið hava ávirkan á útlendinga- og integrasjónsøkið:

### ST

Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi.
Genéve- konventionen om flygtninges retsstilling, 1951, samt tillægsprotokol, 1967.
Konvention om afskaffelse af alle former for racediskrimination, 1965.
Altjóðasemingurin um borgarlig og stjórnmálalig rættindi, 1966.
Altjóðasemingurin um búskapar- almanna- og mentannarrættindi, 1966.
Konvention om afskaffelse af alle former for diskrimination imod kvinder, 1979.
Konvention mod tortur og anden grusom, umenneskelig eller nedværdigende behandling af straf, 1984.
Konvention om barnets rettigheder, 1989, samt Tillægsprotokol om børn i væbnede konflikter, 2000, og Tillægsprotokol om børnesalg og prostitution mv. 2000.
Konvention om kompetence, lovvalg, anerkendelse, fuldbyrdelse og samarbejde vedrørende forældreansvar og foranstaltninger til beskyttelse af børn, 1996.
Konvention om transnational kriminalitet samt tilhørende protokol (Palermo-protokollen) om handel med mennesker, herunder særligt kvinder og børn, 2000.
Konvention om rettigheder for personer med handicap, 2006.

### Europaráðið

Den europæiske menneskerettighedskonvention, 1950, samt tillægsprotokoller.
Den europæiske konvention om social og sundhedsmæssig hjælp, 1953.
Den europæiske Socialpagt, 1961.
Den europæiske kodeks for social sikring, 1964.
Konvention om indsats mod menneskehandel, 2005.

### Norden

Konvention om Social Bistand og Sociale Tjenester, 1994.
Konvention om social sikring, 2003.

## Svøríki

### Málundirvísing

Tilboð um **málundirvísing** leggur seg miðvíst eftir nýggjum flóttafólki og fólki, ið hava fingið familjusameining. Tilboðið snýr seg í miðal um 525 tímar, men er ymist alt eftir tørvinum hjá tí einstaka. Luttøka í málundirvísingini er sjálvboðin, men ætlanin er at gera undirvísingina kravda fyri allar útlendingar, ið hava máltrupulleikar.

Svøríki hevur eitt **innleiðslutilboð** til nýggjar útlendingar. Útlendingurin fær undirvísing í máli, og samfelagslæru og lærir um arbeiðsmarknaðarviðurskifti. Kommunurnar hava skyldu at geva útlendingunum slíkar innleiðsluskráir.

Í Svøríki fáa nýggj flóttafólk tilboð um eina arbeiðsmarknaðarskrá, ið t.d. fatar um starvsvenjing, undirvísing í, hvussu arbeiðsmarknaðurin er skipaður og tílík integrasjónstiltøk.

Útlendingar, ið eru familjusameindir fáa vanliga bara tilboð um málundirvísing við samfelagslæru.

Í Svøríki ráða kommunurnar fyri, hvussu tiltøkini verða skipað. T.d. hava ikki allar kommunurnar skrivliga ætlan fyri, hvussu innleiðslan skal vera. Nakrar kommunur seta undirvísing í svenskum saman við starvsvenjing ella onnur arbeiðsmarknaðartilboð, aðrar kommunur fara ikki undir arbeiðsmarknaðartilboð fyrr enn útlendingurin hevur lært svenskt.

Í Svøríki eru tað fyrst og fremst kommunurnar, ið ábyrgdast fyri at integrera útlendingar í arbeiðsmarknaðin. Kommunurnar arbeiða saman við Arbeiðsloysisskipanunum og øðrum pørtum, ið fáa fólk í arbeiði.

Í Svøríki ber til at nýta fíggjarliga revsing, um útlendingur ikki er við í innleiðsluskráunum. T.d kann viðkomandi missa sína kontanthjálp, fær hann slíka.

Kommunurnar í Svøríki kunnu eisini geva útlendingi, sum er við í einum innleiðslutilboði eina innleiðslusamsýning heldur enn kontanthjálp.

Svøríki setur hvørki málslig krøv ella krøv til at viðkomandi skal hava verið við í innleiðsluskeiðum, tá ið ríkisborgararættur verður givin.

Síðani 2002 hevur ES í sínum árligu tilmælum til Svøríki víst á vantandi arbeiðsmarknaðarintegrasjón fyri útlendingar. Ráðharraráðið og Kommissiónin mæla til, at Svøríki minkar skattatrýstið á arbeiði fyri at fleiri láglønt kunnu hava fyrimun at koma út á arbeiðsmarknaðin og at broyta skatta- og studningsskipanir soleiðis, at arbeiðsorkan verður økt og arbeiðsloysið minkar. Seinastu árini eru tilmælini frá ES vorðin nágreiniligari: serlig herðsla verður løgd á at fáa fleiri útlendingar í arbeiði. Harafturat eigur at verða fylgt væl við, hvussu hesar skipanir virka.

At undirvísingin í svenskum máli er fyri seg við ongum tilknýti til arbeiðslívið, verður ofta hildið at verða ein høvuðsorsøkin til at so nógv leypa frá undirvísingini ella ikki klára tey fyrisettu málini. Undirvísingin er vorðin stigbýtt, men kortini er sera trupult at samskipa útbúgving við t.d. arbeiði, barnaansing ella endurútbúgving.

OECD leggur upp til, at Svøríki serliga fer at leggja dent á arbeiðsmarknaðin í innleiðsluskipanini og ávarar ímóti ov longum tíðarbilum bara við málundirvísing. Mælt verður til lægri byrjanarløn, so at útlendingar lættari skulu koma inn á arbeiðsmarknaðin og á tann hátt fáa møguleika at læra seg málið, men eisini miðvís átøk sum tíðarbundið arbeiði og onnur arbeiði, sum landið veitir stuðul til. Eisini verður lagt upp til almennar fyriskipanir, sum t.d. at broyta ískoytisskipanir fyri at sleppa undan arbeiðsloysi.

Innleiðsluskipanin í Svøríki hevur tey seinastu árini fingið ábreiðslur um vantandi innihald og effektivitet. Seinastu 20 árini hevur bæði samfelagið og innflytingin broytt seg, men innleiðsluskipanin er enn sum heild tann sama. Tað tykist sum um tann óbroytti framferðarhátturin í innleiðsluni ger tað truplari hjá nýkomnum útlendingum at koma inn á arbeiðsmarknaðin og klára seg sjálvar.

Svenski innleiðslu- og integrasjónhátturin víkur alsamt meiri frá hinum londunum í Evropa og vesturheiminum annars, nú tey hava broytt síni lógarverk og sín integrasjónspolitikk. Lond, ið hava verið fyri sama flóttafólkastreymi sum Svøríki, hava um somu tíð sett stórar politiskar nýskipanir í verk til tess at bøta um integrasjónina. Neyðugt verður at síggja hvørjar royndir evropisku londini hava gjørt sær og síðan at bera saman.

Innihaldið í innleiðsluni er veikt orðað og nýliga komnir útlendingar búgva kring alt landið í ymsum kommunum. Tá ið rættindi og skyldur hjá útlendingum er ógreidliga orðað, merkist tað á úrslitinum av innleiðsluni, tá ið útlendingarnir eru spjaddir kring landið.

Ein integrasjónslóg eigur at kunna greiða mál og at ábyrgja einstaklingar, kommunur, og aðrar partar.

Svøríki hevur smíðað lógirnar soleiðis, at borgarlig og sosial rættindi eru tey somu fyri útlendingar sum fyri landsins borgarar. Í flestu øðrum londum í Evropa eru tey sosialu rættindini ikki eins góð fyri útlendingar, sum fyri triðjalandsborgarar, serliga um talan ikki er um flóttafólk. Tá ið ein persónur er fluttur til Svøríkis er ongin rættarligur munur á viðurskiftinum millum hann og ein svenskara. Svensk lóg lýkur tí aðalregluna um sama rætt fyri allar borgarar betri enn lóggáva í hinum evropisku londunum.

Málið við eini innleiðsluskipan er m.a. at innflytarin betur skal skilja og virða grundleggjandi normar og virði í nýggja landinum og læra seg málið fyri at kunna sleppa inn á arbeiðsmarknaðin.

Endaligar útbúgvingar og arbeiðsmarknaðartiltøk eru í teimum mest umfatandi innleiðsluskipanunum.

Svøríki loyvir dupultum ríkisborgararætti.

## Finnland

### Innleiðsluskipan

Kommunan hevur ábyrgdina av at gera innleiðsluskipan fyri útlendingar. Innleiðsluskipanin fatar um fyriskipanir og tænastur til útlendingar, men eisini um samstarv og ábyrgd myndugleikanna millum.

Endamálið við skipanini er at fremja og stuðla undir, at útlendingar verða integreraðir og at lagt verður upp fyri tørvinum hjá tí einstaka útlendinginum í sambandi við tær tænastur og fyriskipanir, ið útlendinginum standa í boði.

## Integrasjónsætlan

Kommunan og arbeiðsávísingin gera í felag eina Integrasjónsætlan fyri einstaka innflytaran. Ætlanin er persónlig og fevnir um tær fyriskipanir og tænastur, ið útlendinginum tørvar, og hjálpir útlendinginum við at nema sær svenskan ella finskan málkunnleika, umframt aðrar førleikar, ið krevjast fyri at virka í finska samfelagnum, arbeiðsmarknaði og felagslívi. Integrasjónsætlanin leggur somuleiðis uppfyri, at øll familjan verður integrerað. Integrasjónsætlanin kann fevna um grundskúla, yrkislesnað, miðnámskúla, útbúgving og víðari útbúgving.

Útlendingar millum 17 og 64 ár, ið eru varandi búsitandi í Finnlandi, og sum eru skrásettir arbeiðsleysir ella sum fáa almannaveiting, hava rætt til eina persónliga Integrasjónsætlan og skal ætlanin verða fyri í mesta lagi 3 ár eftir, at teir eru skrásettir í landsfólkayvirlitinum. Tíðarskeiðið kann verða longt við 2 árum, m.a. um tilflytaranum tørvar grundleggjandi lesi- og skriviførleikar, vegna aldur ella brek, barsil o.sfr.

Tilflytarin fær eina integrasjónsveiting, tá ið báðir partar hava tikið undir við avtaluni um integrasjónsætlanina. Tilflytarin hevur skyldu at fylgja ætlanini.

## Málundirvísing

Integrasjónsætlaninin kann fevna um eina innleiðsluútbúgving, sum er 40 skúlavikur, ið fevnir um málundirvísing og samfelagslæru. Útlendingurin hevur ikki skyldu at nema sær málundirvísing, men myndugleikarnir eggja øllum vaksnum útlendingum til at læra seg málið. Útlendingar kunnu sjálvir gera av, hvussu teir nema sær málundirvísing.

## Ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi

### Ríkisborgararættur

Útlendingar kunnu søkja um finskan ríkisborgararætt eftir 5 árum við ikki-tíðarbundnum uppihaldsloyvi.

Finnland hevur ein minnilutaumboðsmann, og hansara uppgáva er at tryggja rættar- og javnstøðuna hjá útlendingum og minnilutum, umframt at tryggja tjóðfrøðiligu viðurskiftini í Finnlandi.

Finnland loyvir dupultum ríkisborgararætti.

### Familjusameiningsreglurnar í Finnlandi

Finnland fylgir tilmælunum frá UNHCR (United Nations Commission on Human Rights)

Flóttafólk kunnu verða familjusameind við maka og ómyndug børn. Er flóttafólkið ómyndugt kann viðkomandi fáa familjusameining við verjar.

## ES-borgarar

ES borgarum tørvar ikki uppihaldsloyvi fyri at vera í Finnlandi. ES borgarar kunnu frítt vera í Finnlandi í 3 mánaðir, meðan teir t.d. søkja arbeiði. Er steðgurin longri enn 3 mánaðir, skal steðgurin verða skrásettur hjá løgregluni, og teir skulu prógva, at teir kunnu klára seg sjálvar.

ES-borgari, ið er skrásettur sum arbeiðstakari ella sjálvstøðugt vinnurekandi, missir ikki hesa støðu, um hann ikki longur er arbeiðstakari ella sjálvstøðugt vinnurekandi, um viðkomandi:

- Ikki kann arbeiða vegna sjúka ella skaða.
- Er óviljað arbeiðsleysur og skrásettur arbeiðsleysur.
- Er óviljað arbeiðsleysur, eftir at hava verið í starvi minni enn 12 mánaðar. Í hesum førum verður viðkomandi mettur at vera arbeiðstakari í 6 mánaðir, eftir at hann er vorðin arbeiðsleysur.
- Er óviljað arbeiðsleysur og fer undir útbúgving, ið hevur samband við fyrrverandi yrki ella fer undir aðra yrkisútbúgving.
- 

ES-borgari kann fáaikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi eftir 5 árum, hevur hann havt arbeiði alla tíðina.

## Útlendingar í Finnlandi

Tann 1. januar 2010 búðu 5,3 mió fólk í Finnlandi, 155.705 høvdu útlendskan ríkisborgararætt.

Flestu orsøkirnar til at fólk flyta til Finnlands eru arbeiði, lesnaður ella familja. Finnland hevur ikki nógv flóttafólk ella fólk, ið søkja friðskjól. Í 2009 fingu 116 fólk friðskjól og 1200 fólk fingu uppihaldsloyvi av humaniterum ella øðrum orsøkum. Finnland hevur seinastu árini tikið ímóti 750 kvotuflóttafólki um árið.

### Integrasjón í Finnlandi verður kannað

Í 2009 var ein barometurkanning gjørd í Finnlandi, og nakrir útlendingar vórðu spurdir, hvat tað er, ið munar mest í integrasjónini. Kanningin vísti, at arbeiði, tryggleiki og málførleikar hava størstan týdning fyri at integrera útlendingar[10].

Útlendingapolitikkurin í Finnlandi verður framdur við:

- at taka ímóti útlendskum arbeiðstakarum og familjum teirra soleiðis, at Finnlandi verður tryggjað skikkaða arbeiðsmegi og at fakliga grundarlagið í landinum verður styrkt,
- at bøta møguleikarnar fyri, at tilflytarar verða væl viðfarnir og á ein ikki-diskriminerandi hátt,
- at skapa eitt pluralistiskt arbeiðsumhvørvi og bøta eftirlitið við arbeiðsumstøðunum hjá útlendsku arbeiðsmegini,
- at tryggja, at tilflytarar, serliga kvinnur og børn, verða integreraði, eru við í samfelagnum og hava eitt familjulív,
- serliga at varpa ljós á meginreglurnar um "barnsins besta", og at børn og ung verða tryggjað nøktandi útbúgving og integrasjón,
- sambært ST mannarættindasáttmálanum at verja og fyribyrgja, at fólk liva sum flóttafólk og at tey verða flutt,
- sambært ES at halda fast í og fremja reglurnar um altjóða vernd, og at harmonisera finsku reglurnar og at stuðla undir, at nationalu málini verða nádd,
- í andanum í ST flóttafólkasáttmálanum at økja um rættartrygdina hjá teimum, ið biðja um friðskjól, samstundis sum flóttafólkinum verður tryggjað effektiva málsviðgerð og virðiliga viðferð,
- tá ið tikið verður móti flóttafólki, at tryggja, at tey framvegis kunnu vera virkin,
- at tilflytarum, sum viðskiftafólk í almennu umsitingini, verður vístur góður fyrisitingarligur siður, og umsóknir teirra verða viðgjørdar smidliga og uttan drál,
- at minka um órógvið, sum flytingin til Finnlands hevur á útreisulandið, og
- at minka um forðingarnar fyri, at arbeiðsøkjandi útlendingar finna sær starv.

10) Årsoversigt over migration 2009 (www.intermin.fi)

## Noreg

### Málundirvísing og samfelagslæra:

Rættur og skylda til at vera við í ókeypis undirvísing í norskum og samfelagslæru í upp til 300 tímar er galdandi fyri útlendingar millum 16 og 55 ár, sum hava fingið:

- Uppihaldsloyvi við atliti at ikki-tíðarbundnum loyvi.
- Kollektiva verju, tí viðkomandi hevur verið við í hópflýggjan.

Útlendingar, millum 55 og 67 ár hava eisini rætt til at vera við í undirvísingini, men ikki skyldu til tess.

Tann einstaka kommunan hevur skyldu til at skipa fyri innleiðslutilboðnum.

Ætlan verður gjørd fyri hvønn einstakan, sum er við í norska innleiðslutilboðnum.

Tann, sum undirvísir í norskum og samfelagslæru, skal sum høvuðsreglu hava yrkisligan og námsfrøðiligan førleika.

### Innleiðslutilboð

Útlendingar, ið hava fingið friðskjól, uppihaldsloyvi sum "skiftis" flóttafólk, útlendingar, ið hava søkt um friðskjól, ella kollektivt hava søkt um friðskjól vegna "hópflýggjan", eins og útlendingar, sum eru í familju við omanfyri nevndu, hava allir, um teir eru nýkomnir útlendingar, millum 18 og 55 ár, rætt og skyldu til at vera við í innleiðsluskrá, um teimum tørvar at nema sær onkran grundleggjandi førleika.

Sum nýkomin útlendingur er at rokna tann, ið hevur búð í kommununi í minni enn 2 ár.

Norðurlendskir borgarar og útlendingar, sum EBS fatar um, eru ikki fevndir av kravinum um innleiðsluskrá.

Innleiðsluskráin er ætlað soleiðis, at útlendingurin fær grundleggjandi kunnleika til norska málið, eina grundleggjandi vitan um norska samfelagið eins og at útlendingurin verður fyrireikaður til at fara út í norska vinnulívið.

Innleiðslutilboðið varar fulla tíð í eitt ár. Tó kann tilboðið vara í upp til 2 ár og í serligum førum í heilt upp til 3 ár.

Innleiðsluætlan kann verða smíðað til tann einstaka.

Tá ið ein útlendingur er við í innleiðslutilboðnum hevur viðkomandi rætt til almennan stuðul.

# Skjal 2.
# Alment um flóttafólkaøkið í Føroyum

Flóttafólkamál eru torgreind. Neyvt umhugsni má tí verða fyri serstøðu Føroya. Um politiska skipanin vil yvirtaka flóttafólkaøkið saman við útlendingarøkinum, er neyðugt, at politiska skipanin leggur uppfyri, at ymsar skipanir skulu verða settar í verk, tí flóttafólkaøkið er fevnt av ymsum altjóða sáttmálum, sum skulu verða hildnir.

Viðvíkjandi reglunum um friðskjól, líkjast lógirnar í sammetingarlondunum sera nógv, tí øll fullvalda lond eru sambært altjóða lóg bundin at veita flóttafólki friðskjól, um heimlandið hjá flóttafólkinum ikki verjir grundleggjandi mannarættindi ella humaniteru rættindi hansara. Londini hava øll tikið undir við teimum somu altjóða sáttmálunum, sum verja hesi rættindi.

Eftir hesum sáttmálum hava tey undirskrivandi londini skyldu til at viðurkenna tey sum flóttafólk, sum hava verið fyri álvarsligum mannarættindabrotum ella brotum á humaniteru rættindini teirra, og tí eru noydd at flýggja undan ítøkiligum hóttanum móti lívi, heilsu og grundleggjandi mannarættindum, tá ið hesir vandar standast av, at heimlandið ikki verjir mannarættindi ella humaniteru rættindi teirra. Tí verða slíkar umsóknir allastaðni viðgjørdar á einsháttaðan og rættiliga líkan hátt.

Føroyar eru í serstøðu á flóttafólkaøkinum, tí Føroyar eru egið løgdømi, men eru ikki eitt fullvalda land.

At Føroyar eru egið løgdømi, merkir m.a., at rættarreglur kunnu galda í Føroyum, hóast tær ikki galda í Danmark, og at serlig mannagongd krevst, um rættarreglur, sum galda í Danmark, eisini skulu galda í Føroyum. Sama er við rættindum, ið fólk fáa við fyrisitingarligum avgerðum. Eitt uppihaldsloyvi, sum útlendingur fær í Danmark, geldur ikki í Føroyum, og uppihaldsloyvi, sum útlendingur fær í Føroyum, geldur ikki í Danmark. Sum greitt frá frammanfyri, so eru tað fullvalda lond, sum eru sáttmálapartar, og tað eru fullvalda lond og einstaklingar, ið eru evni í sáttmálunum, sum geva flóttafólki rættindi. Tí eru tað eisini fullvalda lond, ið geva friðskjól. Tey geva borgara úr fullvalda landi, ið ikki gevur honum ta vernd, ið tað hevur skyldu til at geva øllum borgarum sínum, verndina, ið hann átti at fingið í heimlandinum. Og hetta er uttan mun til, hvussu landið, ið veitir friðskjól, annars er skipað innlendis. Vit kunnu til dømis nevna, at Kalifornia ikki kann geva friðskjól, hóast hesin landspartur hevur egna løgreglu, egið dómsvald, egið lóggávuvald og egna grundlóg, tí í mun til altjóðarætt er Kalifornia ein landslutur í sambandsríkinum USA.

Hvørt tað er møguligt hjá føroyskum myndugleikum at geva flóttafólki friðskjól, er tó bara ein teoretiskur spurningur, um ríkisstjórnin tekur undir við tí. Onnur lond fara við virðing fyri fullveldi og innanríkis sjálvræðinum hjá kongsríkinum Danmark ikki at taka støðu til spurningin; men vit kunnu við vissu staðfesta, at fortreytin fyri, at Føroyar kunnu metast at hava skyldu til at átaka sær hesa skyldu, er, at kongsríkið Danmark hvørki er at meta sum eindarríki ella sambandsríki, men sum ríkjasamband eftir altjóða lóg. Skuldi tað verið mett, at støðan nú er henda – at ríkisfelagsskapurin við øðrum orðum er ríkjafelagsskapurin – kundi verið natúrligt at Føroyar samstundis eisini tekur undir við nevndu sáttmálum egna vegna.

Er metingin hinvegin, at kongsríkið Danmark er annaðhvørt eitt eindarríki (sum almenna danska fatanin oftast verður søgd at vera) ella okkurt slag av sambandsríki (sum almenna føroyska fatanin oftast verður søgd at vera), er tað alt annað enn sjálvsagt, at Føroyar skulu átaka sær hesa uppgávu ríkisins vegna.

Herafturat eru ítøkilig, verklig viðurskifti, sum vit her stutt skulu nevna, ið benda á, at tað er ivasamt, um tað man vera ráðiligt, at Føroyar átaka sær eina serstøðu í mun til altjóða rætt við at yvirtaka flóttafólkaøkið.

Flóttafólk í Føroyum eru sum lundi á jólanátt. Ongin er skrásettur í hagtølunum hjá løgregluni, sum ganga heilt nógv ár aftur í tíðina. Tó hevur okkurt hendinga flóttafólk verið her í farnu øld, síðani Kongsríki Danmarkar í 1962 háveldisstaðfesti ST flóttasáttmálan. Kongsríki Danmarkar hevur ikki tikið móti kvotaflóttafólki við atliti at friðskjóli í Føroyum.

Í mun til útlendingar annars eru flóttafólk av fleiri ymiskum orsøkum í eini serliga truplari støðu, tá ið tey koma til landið, og tað ger, at avbjóðingin fyri Føroyar at integrera tey við føroyska samfelagið verður ómetaliga stór.

Tá ið útlendingar annars seta búgv her, er tað annaðhvørt, tí at tey hava fingið arbeiði her, ella tí at tey eru familjusameind við onkran her.

Orsøkin til at tey hava fingið uppihaldsloyvi er sostatt, at longu áðrenn tey eru komin til landið, hava tey samband við føroyska samfelagið. Tey hava samband við einstaklingar ella arbeiðspláss í landinum ella bæði. Tey koma til nakað, og tí er hurðin til eina byrjandi – um enn, sum er, óskipaða og tilvildarliga – integrasjón longu gloppað. Bæði samfelagið og nýkomni útlendingurin kunnu, ið hvussu so er, hugsast at njóta gott av lítla samfelagnum, her sum "øll kenna øll", og mong kenna ábyrgd hvør fyri øðrum.

Tann sum verður familjusameindur, kemur til dømis altíð til ein skikkaðan bústað (tað er ein treyt), og arbeiðsgevarin hevur ein sjálvsagdan áhuga í at hjálpa tí, sum fær arbeiðsloyvi, at finna bústað.

Flóttafólkið kemur harafturímóti til landið undan neyð. Hann flýggjar frá ótolandi umstøðum, og kemur ikki til annað enn (vónandi) tryggleika, og hevur yvirhøvur onki samband við samfelagið frammanundan. Tí fáa vit ikki nakran fyrimun av, at samfelagið er lítið – heldur hinvegin. Eyvitað ber til at hugsa sær føri, har flóttafólk natúrliga fáa samband við okkurt av trúarsamfeløgunum her, og soleiðis finna eina leið til at verða tikin upp í føroyska samfelagið, men hyggja vit eftir, hvaðan flestu flóttafólkini koma, eru munandi størri sannlíkindi fyri at átrúnaðarlig viðurskifti oftast kunnu verða enn ein forðing fyri integrasjón.

Vit kunnu siga, at aðrir útlendingar koma altíð til landið, tí tað longu frammanundan er skjalfast, at tey á onkran hátt fara at ríka samfelagið við onkrum. Hin familjusameindi gevur við hjáveru síni einum ella fleiri herbúgvandi eina heila familjueind, meðan tann, sum fær arbeiðsloyvi, ríkar samfelagsbúskapin við arbeiðsmegi og førleikum sínum.

Flóttafólkið kemur harafturímóti til landið, tí at tí tørvar nakað frá samfelagnum. Í fyrstu atløgu er tørvurin so grundleggjandi sum tryggleiki, matur og klæði, og her eru Føroyar væl fyri at hjálpa; men longu, tá ið um býli ræður, stendur á: ongir almennir leigubústaðir eru, og tí noyðist ein møguligur føroyskur flóttafólkamyndugleiki at finna flóttafólki býli á privata bústaðarmarknaðinum. Tað kann gerast bæði trupult og kostnaðarmikið.

Flestøll flóttafólk hava harafturat tørv á samansettari viðgerð. Tey hava verið fyri sálarløstandi upplivingum - annars verða tey ikki viðurkend sum flóttafólk. Ofta hava tey harafturat verið fyri skipaðari og áhaldandi pínining, og endiliga hava tey ofta í tilveruni sum flóttafólk fingið ymiskar sjúkur, ið ikki eru vanligar um okkara leiðir. Teimum tørvar tí viðgerð, oftast psykiatriska og sosialfakliga viðgerð, umframt likamliga heilsuviðgerð (ein partur av kvotuflóttafólkunum skal vera fólk við serliga viðgerðarkrevjandi sjúkum), ið Føroyar í flestu førum ikki fara at megna at veita, tí neyðugu førleikarnir eru ikki í landinum. Harafturat kemur ein stórur, áhaldandi samskiftistrupulleiki: Viðgerðin treytar aloftast, at tey viðgerandi og tey viðgjørdu kunnu samskifta støðugt og neyvt. Aftur hetta er ein ovurhonds trupulleiki, tí ongin skipað tulkatænasta er, og talan kann vera um at tulka til mál, ið kanska ikki eru í landinum frammanundan.

Vit kunnu eitt nú bera saman við barnaverndarmál. Í barnaverndarmálum er heilt vanligt, at barnaverndartænastan hjálpir børnum, ið eitt nú vegna sálarløstandi upplivingar tørvar meira krevjandi viðgerðartilboð á markamótinum millum psykiatriska og sosialfakliga viðgerð, til viðgerðar uttanlands, tí at ikki ber til at skipa nøktandi tilboð í landinum. Tá ið um flóttafólk ræður, ber ikki til at senda tey til viðgerðar í nøkrum øðrum landi – heldur ikki í Danmark – tí hava tey fyrst fingið friðskjól einastaðni, fáa tey ikki uppihaldsloyvi, hvørki longri ella styttri, nakra aðrastaðni.

Tað gongur upp hjá ríkum, vælskipanum smátjóðum sum t.d. Danmark at veita nøktandi viðgerðir og tilboð, og hetta verður lutfalsliga nógvar ferðir truplari hjá pinkutjóð sum Føroyum. Einasti møguleiki Føroya hava at halda skyldur sínar mótvegis slíkum flóttafólki verður at gera avtalur við viðgerandi serfrøðingar og tulkar um at koma regluliga til Føroya at fremja neyðugu viðgerðirnar. Tað verður kostnaðarmikið.

Eisini hjá fólkaskúlanum fara flóttafólk at vera ein heilt serstøk, tilfeingiskrevjandi uppgáva. Meðan tað kanska ber til at liva við, at børn hjá útlendingum annars ikki fáa móðurmálsundirvísing, ber valla til at koma sær undan hesi skyldu, tá ið um flóttafólk ræður. Herumframt verður tørvur á serligum tilboði í sambandi við vanligu undirvísingina. Talan er um børn

sum hava havt sálarløstandi upplivingar og tí eru ávirkað bæði sálarliga og kanska eisini likamliga – sum er, gongst illa at veita atferðatruplum ella børnum við serligum tørvi annars ta serliga tillagaðu undirvísing, teimum tørvar. Tá ið um útbúgving ræður, stendur eisini illa til, tí føroyska samfelagið dúvar so nógv uppá, at føroyingar taka útbúgvingar í øðrum londum. Hesin møguleikin er ikki til, tá ið um flóttafólk ræður. Hava tey fyrst fingið friðskjól einastaðni, fáa tey ikki uppihaldsloyvi, hvørki longri ella styttri, nakra aðrastaðni.

Endiliga er vert at nevna sjálva málsviðgerðina av umsóknum um friðskjól, sum er heilt frágerða tilfeingiskrevjandi: tað kann taka upp í fleiri ár at fáa til vega nøktandi prógv í málunum (flóttafólk hava til dømis javnan als ongi samleikaprógv, og við hvørt virka ongir myndugleikar yvirhøvur í økinum, tey koma úr), og serstakliga stór, samansett og dagførd servitan krevst, til tess at meta um viðurskiftini í málinum, bæði um samleika-tengdar upplýsingar, so sum samleika og aldur, persónligu vandastøðuna hjá flóttafólkunum og um vandastøðuna í heimlandinum.

Havandi í huga, hvussu fáar umsóknir kunnu væntast, fer í roynd og veru valla at bera til at byggja upp egnan føroyskan førleika at viðgera umsóknir og halda førleikan viðlíka. Helst er bæði tryggari og bíligari at útveita flestu lið í fyrireikandi málsviðgerðini til donsku myndugleikarnar, sum annaðhvørt kunnu fáa kostnaðarendurgjald fyri hvørja málsviðgerð sær, ella fáa eitt fast gjald um árið, uttan mun til umsóknir.

Vísandi til, at tað í besta føri er ivasamt, um Føroyar í verandi ríkisfelagsskapsstøðu hevur skyldu ella heimildir til at yvirtaka flóttaøkið, og at tað í royndum verður so at siga ómøguligt at sita fyri økinum á nøktandi hátt, mælir arbeiðsbólkurin til, at umhugsað verður, hvørt tað er ráðiligt, at økið verður yvirtikið í sambandi við, at útlendingamál annars verða yvirtikin.

Arbeiðsbólkurin metir ikki, at flóttafólkaøkið er so nær tengt at útlendingamálum annars, at tað er sjálvsagt, at flóttafólkaøkið skal verða tikið við, tá ið útlendingamál annars koma undir føroyskt málsræði.

# Skjal 3. Útlendingar og uppihald

## Pensjón

Sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er rætturin til pensjón treytaður av, at tann, ið fær pensjón

1) hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti,

2) hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi skrásett í Føroyum, og

3) hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum til fylta 67. árið.

Samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um undantak frá treytunum um danskan heimarætt og um fastan bústað í Føroyum[11].

Sum útgangsstøði hava útlendingar, ið t.d. eru giftir persóni við donskum heimarætti og sum hava búð í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár innan fylta 67. árið rætt til pensjón samsvarandi almannapensjónslógini.

Tó kann landsstýrismaðurin, tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, gera undantøk frá regluni um danskan heimarætt fyri persónar, sum hava havt fastan bústað í Føroyum í minsta lagi 10 ár millum fylta 15. árið og fylta 67. árið, herav minst 5 ár, beint áðrenn pensjón verður tillutað.

Fyri at verða fevndur av undantakinum um heimarætt skulu í fyrsta lagi heilt serligar umstøður vera galdandi. Sambært upprunaligu viðmerkingunum til almannapensjónslógina verður nevnt sum ítøkiligt dømi, persónar við heimarætti í einum landi, sum eingin sáttmáli er gjørdur við, men sum í nærum ein mansaldur hava arbeitt og tænt landinum í samstarvi við persónar úr londum, sum sáttmáli er gjørdur við. Hesi seinast nevndu hava sambært sáttmála rætt til pensjón aftan á 5 ella 10 ára bústaðartíð, teir fyrst nevndu hava ikki henda møguleika. Tí er rímiligt at heimila landsstýrismanninum at gera undantøk frá kravinum um danskan heimarætt í tilíkum serligum førum, um viðkomandi ikki hevur innvunnið sær rætt til eina pensión í viðkomandi landi, ið er eins høg og føroyska pensjónin.

## Pensjónsupphæddin

Rætturin til fulla pensjón til *fólkapensjónistar* er treytaður av føstum bústaði í danska ríkinum í minsta lagi 40 ár. Er treytin fyri fullari pensjón ikki lokin, verður pensjónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 40 ár.

Tá ið *serligar umstøður* tala fyri tí, kann landsstýrismaðurin gera undantøk frá regluni um í minsta lagi at hava búð í danska ríkinum í 40 ár fyri at fáa rætt til fulla pensjón. Trivnaðarnevndin mælti til undir viðgerðini av almannapensjónslógini í 1998 at seta hesa heimildina í lógina, men álitið hjá Trivnaðarnevndini sigur einki um, hvussu henda heimildin skal verða nýtt. Helst skal ásetingin veita heimild fyri í serligum førum, at veita føroyingum, ið hava verið uttanlands í mong ár og sum síðan flyta heimaftur, rætt til fulla pensjón.

Heimildin til undantak er bert galdandi fyri fólkapensjónistar og ikki fyri fyritíðarpensjónistar.

Rætturin til fulla pensjón til *fyritíðarpensjónistar* er treytaður av, at bústaðartíðin í danska ríkinum er í minsta lagi 4/5 av árunum frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri játtan av pensjón. Er treytin fyri at tilluta fulla pensjón ikki lokin, verður pensjónin ásett eftir lutfallinum millum bústaðartíðina og 4/5 av tíðini frá tí fylta 15. árinum til dagfestingina fyri tillutan av pensjón. Talan er um sokallaða brøkpensjón.

---

11. Danmark hevur gjørt tvílandasáttmálar við Avstralia, Bosnia-Hersegovina, Kanada, Kile, Ísrael, Kroatia, Makedonia (FYROM), Marokko, Montenegro, Ný Sæland, Pakistan, Serbia, Turkaland og USA.
Harumframt hevur Danmark tikið undir við Nordisk konvention om social sikring, ið fevnir um Danmark, Finnland, Island, Noreg og Svøríki, og Europæisk konvention om social sikring, ið fevnir um Belgia, Bulgaria, Kypern (grikska partin), Danmark, Estland, Finnland, Frakland, Grikkaland, Niðurlond, Írland, Ísland, Italia, Letland, Liktinstein, Litava, Luksemborg, Malta, Noreg, Pólland, Portugal, Rumenia, Slovakia, Slovenia, Spania, Bretland, Svøríki, Kekkia, Týskland, Ungarn og Eysturríki. Sveis hevur sínámillum sáttmálar við hesi lond.

Er støðan tann, at útlendingur bara hevur vunnið rættin til brøkpensjón, og tann upphæddin er ov lítil til lívsins uppihald, kann viðkomandi hava rætt til viðbót sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar. Hesa viðbót kann ein og hvør pensjónstur, ið er búsitandi í Føroyum, fáa. Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 60.000,-, og at giftur pensjónistur saman við hjúnafelaga ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensjónina enn kr. 80.000,-. Til grund fyri at veita viðbótina verður løgd inntøkan, sum liggur til grund fyri pensjónsútrokningini útgjaldingardagin.

Harumframt er møguleiki sambært § 12 í almannapensjónslógini at veita persónliga viðbót til pensjónist, ið hevur serliga trupul kor. Talan kann verða um stuðul at rinda stakútreiðslu ella framhaldandi útreiðslu. Tað er ein treyt fyri at fáa viðbót, at tann útreiðslan, sum søkt verður um, verður mett at vera neyðug og rímiliga grundað. Almannastovan ger í hvørjum einstøkum føri av, um ein fólkapensjónistur ella ein fyritíðarpensjónistur skal fáa persónliga viðbót.

Almannastovan ger tørvsmetingina við støði í eini heildarmeting av støðuni hjá pensjónistinum og møguligum hjúnafelaga, herundir av ognum, inntøkum, útreiðslum og sosialu viðurskiftunum annars. Sum inntøka verður roknað øll inntøka, tó frároknað barnaviðbót, røktarviðbót og hjálparviðbót hjá bæði pensjónistinum og møguligum hjúnafelaga.

## Millumlanda avtalur og sáttmálar

Soleiðis sum føroyska almannapensjónslógin er orðað hava útlendingar, ið ikki hava danskan heimarætt ella sum ikki eru, ella seinast hava verið giftir við einum persóni við donskum heimarætti, ikki rætt til føroyska pensjón. Hetta er uttan mun til, um útlendingurin hevur fingið ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi í Føroyum.

Sum áður nevnt, kann verða vikið frá kravinum um danskan heimarætt, men bert í heilt serligum førum. Rættin til pensjón í Danmark hava persónar við donskum heimarætti ella persónar, ið hava havt fastan bústað í ríkinum í minsta lagi 10 ár millum fylta 15. árið og fylta 67. árið, herav minst 5 ár, beint áðrenn pensjón verður tillutað.

Tó kann landsstýrismaðurin, samsvarandi reglum í sáttmálum við onnur lond, áseta reglur um undantak frá treytunum um danskan heimarætt og fastan bústað í Føroyum ella hýru við skipi, skrásettum í Føroyum.

Føroyar eru fevndar av Nordisk konvention om social sikring, ið fevnir um Danmark, Noreg, Svøríki, Ísland og Finnland. Tað er rættiliga óvist um og í hvønn mun Føroyar eru fevndar av øðrum sáttmálum og avtalum. Í flestu førum eru Føroyar *ikki* fevndar av millumlanda avtalum, ið Danmark hevur gjørt á pensjónsøkinum, og tí er rættuliga ógreitt í hvønn mun útlendingar hava rætt til pensjón úr heimlandinum. Hetta er bæði galdandi fyri útlendingar, ið als ikki hava rætt til føroyska pensjón og fyri útlendingar, ið bara hava rætt til føroyska brøkpensjón.

Sum heild eru pensjónsviðurskiftini hjá útlendingum rættuliga ógreið. Arbeiðsbólkurin mælir landsstýrinum til, at hesi rættindi verða nærri lýst og viðgjørd.

## Arbeiðsmarknaðareftirløn

Rættin til útgjald sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (samhaldsfasta) eigur hvør persónur, ið hevur fylt 67 ár, og sum í minst trý ár, meðan hann var millum 15 og 67 ára gamal, tá hevði fastan bústað í Føroyum og var skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum.

Upphæddin er 1/40 av fullari arbeiðsmarknaðareftirløn fyri hvørt árið, tó í mesta lagi 40 ár, persónurin hevur havt fastan bústað í Føroyum og verið skrásettur í fólkayvirlitinum í Føroyum, meðan viðkomandi var millum 15 og 67 ára gamal.

## Arbeiðsskaðatryggingarlógin

Endamálið við arbeiðsskaðatryggingarlógini er at veita endurgjald til persónar, ið koma til skaða, ella teirra avvarðandi orsakað av óhappi í sambandi við útinnan av arbeiði.

Sambært arbeiðsskaðatryggingarlógini er tann, sum fyri løn ella óløntur verður settur í starv hjá føroyskum arbeiðsgevara at arbeiða støðugt ella fyribils á føroyskum landøki, sjóøki ella loftrúmi yvir nevndu økjum, tryggjaður móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

## Forsorgarveiting og dagpeningur

Øll, ið ikki kunnu uppihalda sær sjálvum, hava rætt til forsorgarveiting. Hetta er galdandi fyri føroyingar eins væl og útlendingar.

Hjúnafelagar hava uppihaldsskyldu mótvegis hvør øðrum og foreldur hava uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár. Tað merkir, at lagt verður upp fyri inntøku hjá hjúnafelaga, tá ið persónar søkja um forsorgarveiting.

Uppihaldsskyldan mótvegis børnum steðgar, tá ið barnið fer í hjúnalag ella fram til 8 vikur undan, at dóttir skal føða barn.

Dagpeningur verður veittur orsakað av óarbeiðsføri vegna sjúku, skaðatilburð og fráveru fyri føðing og vegna heilsuvanda fyri móður ella barni. Rætturin til dagpening er treytaður av føstum bústaði og fullari skattskyldu í Føroyum. Viðvíkjandi føstum bústaði er tað ein treyt, at viðkomandi er skrásettur í fólkayvirlitinum sum heimahoyrandi / búsitandi í Føroyum.

At útlendingur fær almannaveiting kann hava ávirkan á uppihaldsloyvið hjá viðkomandi. Hetta er serliga galdandi fyri útlendingar við arbeiðsloyvi og fyri útlendingar við fyribils uppihaldsloyvi.

Hevur persónur tørv á forsorgarveiting, skal Almannastovan hjálpa viðkomandi at koma aftur í arbeiði ella um neyðugt at veita viðkomandi hjálp til at menna ella endumenna arbeiðsførleikan soleiðis, at viðkomandi aftur kann uppihalda sær sjálvum.

Hevur útlendingur við ikki-tíðarbundnum uppihaldsloyvi í Føroyum tørv á at menna ella at endurmenna sín arbeiðsførleika, er fyritreytin fyri tílíkari tilgongd, at viðkomandi hevur neyðugar málførleikar. Manglandi integrasjón kann tí verða forðandi fyri útlendingin og verða við til at halda viðkomandi føstum í einari sosialari støðu.

At útlendingur verður hildin fastur í einari sosialari støði vegna vantandi málførleikar kann harafturat hava stórar avleiddar avleiðingar fyri børnini hjá viðkomandi útlendingi. Hetta kann gerast galdandi fyri útlendsku kvinnuna, ið hevur børn og verður fyri hjúnaskilnaði.

## Útlendingur í Føroyum við arbeiðs- og uppihaldsloyvi

Grundarlagið undir arbeiðs- og uppihaldsloyvi er, at útlendingurin hevur arbeiði á ávísum góðkendum arbeiðstaði. Hevur útlendingurin ikki longur eitt arbeiði, ella fær ikki røkt sítt arbeiði, er grundarlagið undir loyvinum burtur.

Hevur útlendingurin verið fyri einari almannahending, hevur viðkomandi rætt til almannaveitingar, meðan t.d. viðgerð av arbeiðsloyvinum fer fram. Hevur útlendingur við arbeiðsloyvi fingið almannahjálp kann viðkomandi missa rættin til at leingja arbeiðsloyvið, missa rættin til ikki-tíðarbundið uppihaldsloyvi umframt, at tað kann ávirka rættin til danskan heimarætt.

Sama er galdandi fyri loyvið hjá samfylgjandi familju til persón við arbeiðsloyvi.

Útlendingar, ið arbeiða í fiskavirkjum, eru fevndir av Fiskavirkisskipanini hjá ALS, men hava annars ikki rætt til útgjald frá ALS, tí útlendingar við arbeiðs- og uppihaldloyvi verða ikki mettir at vera tøkir á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Arbeiðs- og uppihaldsloyvi gevur bara rætt til at arbeiða á ávísum staði. Útlendingur kann bara skifta arbeiðsstað við loyvi frá útlendingamyndugleikunum.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
WWW.IMR.FO